INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

**Løgtingið**

xx desembur 2008
Mál:
Tygara skriv:
Viðgjørt:

**Løgtingsmál nr. xx/2008:Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu**

## Uppskot

## til

## løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu

**§ 1**

Í løgtingslóg um ferðslu, sbr. løgtingslógarkunngerð nr. 14 frá 2. mars 1988, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, verða gjørdar hesar broytingar:

**1)** § 2, III, B, verður orðað soleiðis:
**”B. Traktor**: Motordrivið akfar, sum í høvuðsheitum er útgjørt at draga annað akfar ella arbeiðsamboð, og sum er gjørt at ganga í mesta lagi 40 km/t.”

**2)** § 2, IV verður orðað soleiðis:

“IV
**Viðfestiakfar:** Akfar, ið er tilgjørt til at vera drigið av øðrum akfari. Viðfestiakfør verða býtt í viðfestivogn, leguvogn og viðfest amboð.

**Viðfestivognur:** Akfar, sum drigið verður av motordrivnum akfari og er ætlað til fólka- ella vøruflutning, leguvognur tó undantikin.

**Leguvognur:** Akfar, sum koplað verður uppí motordrivið akfar, so at akfarið ella tess last liggur inn á tað akfarið, sum dregur, og sum er ætlað til fólka- ella vøruflutning.

**Viðfest amboð:** Annað akfar, sum koplað verður uppí annað motordrivið akfar. Húsvognur er mettur sum viðfest amboð.

**Síðuvognur:** Akfar við eittans hjóli, sum koplað verður upp í síðuna á motorsúkklu á 2 hjólum, og ætlað er til fólka- ella vøruflutning.”

**3)** Yvirskriftin yvir § 15 ”Sjúka, overving v.m.” verður broytt til ”Tilvitsávirkandi evni, sjúka, overving v.m.”

**4)** § 15 verður orðað soleiðis:

”**§ 15**. Ongin má føra ella royna at føra motordrivið akfar, hvørs blóð meðan ella aftaná koyrt verður hevur í sær

evni, ið ávirka tilvitið, sum sambært reglum ásettum av landsstýrismanninum eru flokkað sum vandamikil fyri ferðslutrygdina. Henda áseting verður tó ikki at nýta á evni, sum viðkomandi hevur tikið sambært og í samsvari við eina lógliga ávísing.
*Stk. 2.* Heldur ongin má føra ella royna at føra eitt motordrivið akfar, sum orsakað av sjúku, veikleika, overving, ovvekur ella undir árini av huglættandi ella doyvandi evnum ella av tílíkum grundum er soleiðis háttaður, at hann er ikki førur at føra akfarið á tryggan hátt."

**5)** Aftaná § 15, verður sum yvirskrift sett: "*Rúsdrekkakoyring v.m.*"

**6)** Í § 16, stk. 1, 1. pkt., verður "0,80o/oo" broytt til: "0,50 promillu, ella um alkoholstyrkin í útandingarluftini meðan hann koyrir ella aftaná fer upp um 0,25 mg pr. litur luft."

**7)** Í § 16, stk. 1, 2. pkt., verður "0,80o/oo" broytt til: "0,50 promillu, ella um alkoholstyrkin í útandingarluftini í nevnda tíðarbili ella aftaná fer upp um 0,25 mg pr. litur luft."

**8)** § 16, stk. 3, verður strikað, og stk. 4-6 verða hereftir stk. 3-5.

**9)** Í § 16, stk. 4, sum verður stk. 3, verður "1.-3. stk." broytt til: "stk. 1 og 2".

**10)** Í § 16, stk. 5 og stk. 6, sum verða stk. 4 og stk. 5, verður aftaná orðið "rúsdrekka" sett: "ella av teimum í § 15, stk. 2, nevndu grundum"

**11)** Í § 16 a, stk. 1, verður orðið "útandingarroynd" broytt til: "útandingar-, sveitta- ella spýttroynd ella letur eyguni kannað. Løgreglan kann krevja, at ein persónur ger útandingarroynd á øðrum stað, enn komið er fram á hann, um orsøk er til at halda, at hann hevur framt brot á § 16."

**12)** Í § 16 a, stk. 2, verður "§ 16, 1.-5. stk." broytt til: "§ 16, stk. 1-4"

**13)** Í § 18, stk. 4, nr. 4, verður orðið "viðfestivogn" broytt til: "viðfestiakfar".

**14)** § 18 c, stk. 3, 2. pkt. verður orðað soleiðis:
"Er persónur frádømdur koyrirættin treytaleyst orsakað av rúsdrekkakoyring, kann hann tá ið frádømutíðin er umliðin, einans afturvinna koyrirættin aftaná at hava luttikið í skeiði í rúsdrekka og ferðslu (R/F-skeiði), og tá ein eftiransandi koyriroynd er staðin."

**15)** Í § 18 c, stk. 3, verður sum síðsta punktum sett: "Hóast ein koyriroynd er staðin, skal hin dømdi hava luttikið í R/F-skeiði.".

**16)** § 18 c, stk. 4, verður orðað soleiðis:
"*Stk. 4.* Er persónur frádømdur koyrirættin treytað, skal hann innan eina freist, sum verður ásett av Akstovuni, til eina eftiransandi koyriroynd. Er koyrirætturin frádømdur treytað vegna rúsdrekkakoyring, skal viðkomandi áðrenn eftiransandi koyriroyndina hava luttikið í skeiði í rúsdrekka og ferðslu (R/F-skeiði). Koyrirætturin verður tikin, um viðkomandi ikki stendur royndina ella letur vera við at fara til hana. Eftiransandi roynd verður ikki kravd, um so er, at hin dømdi hevur staðið eina koyriroynd, ið inniheldur ferðsluástøði, aftaná tilburðin, sum var orsøk til frádømingina. Hóast ein koyriroynd er staðin, skal hin dømdi hava luttikið í R/F-skeiði.".

**17)** § 18 c, stk. 5, verður orðað soleiðis:
"*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin ásetur reglur um innihaldið í koyrifrálæruni og um fremjingina av R/F-skeiðunum í sambandi við endurvinning av koyrirættinum aftaná eina treytaleysa ella treytaða frádøming, og um eftiransandi koyriroynd, herundir um afturtøku av koyrirættinum smb. stk. 4."

**18)** Í § 18 d, verður sum nýtt stk. 2 sett:
"*Stk. 2.* Er koyriforboð givið eftir § 59 h fyri tilburðir, sum eru umfataðir av § 59 a, stk. 1, nr. 2, kann førarin einans fáa koyrirættindini aftur, um hesin frammanundan hevur luttikið í einum R/F-skeiði og hevur staðið eina eftiransandi koyriroynd."

Stk. 2-4 verður hereftir stk. 3-5.

**19)** Í § 18 d, stk. 3, ið verður stk. 4, verða orðini "Serlig koyrifrálæra skal verða gjøgnumførd" broytt til: "Serlig koyrifrálæra ella R/F-skeið skal verða gjøgnumført".

**20)** § 33 a, stk. 1, nr. 6, verður orðað soleiðis:
"6) á strekki, har akbreytin framman fyri vegamót við hindrunarstriku er løgd sundur í farbreytir ella 5 m áðrenn eitt slíkt strekki byrjar,"

**21)** Í § 36 verður aftaná stk. 2, sum nýtt stykki sett:
"*Stk. 3.* Tað er bannað at hava ferðafólk í last- ella vørurúmi í akfari. Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um undantak frá 1. pkt."
Stk. 3-5 verða hereftir stk. 4-6.

**22)** Yvirskriftin yvir § 42 "Trygdarútgerð", § 42 og § 42 a verða strikaðar, og í staðin verður sett:

"*Trygdarbelti*

**§ 42.** Um sæti í einum bili ella á tríhjólaðari motorsúkklu hevur trygdarbelti, skal hetta undir koyring nýtast av tí persóni, sum í sætinum situr, sbr. tó stk. 2 og 3 og § 42 b. Saman við trygdarbelti kann selakoddi verða nýttur.
*Stk. 2.* Skyldan at nýta trygdarbelti er ikki galdandi undir bakking ella undir koyring á parkeringsplássi, bensinstøð, verkstaðarøki ella undir líknandi viðurskiftum.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at ávísir persónar sleppa undan skylduni at nýta trygdarbelti, sbr. stk. 1, heruppií í sambandi við serstøk sløg av koyring.
*Stk. 4.* Bilførarin skal ansa eftir, at ferðandi, sum ikki eru fylt 15 ár, nýta trygdarbelti í samsvari við stk. 1 og reglur ásettar sambært stk. 3. Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at førarin av einum bussi heilt ella lutvíst sleppur undan skylduni sambært 1. pkt, og um hvørji tiltøk førarin í staðin skal gera.

*Trygdarútgerð til børn*

**§ 42 a.** Tá koyrt verður í øðrum bilum enn bussum ella á tríhjólaðari motorsúkklu, ið hava sæti til ferðandi við trygdarbelti, skulu børn, ið eru minni enn 135 cm undir koyring nýta góðkenda trygdarútgerð, sum er tillagað hædd og vekt barnsins, sbr. tó stk. 5.
*Stk. 2.* Í øðrum bilum enn bussum, ið ikki hava sæti við trygdarbelti til ferðandi, har góðkend trygdarútgerð tillagað hædd og vekt barnsins kann verða sett í, kunnu børn undir 3 ár ikki verða flutt, meðan børn, sum eru 3 ár og eldri og undir 135 cm, einans kunnu verða flutt á einum øðrum sæti enn forsetrinum, sbr. tó stk. 5.
*Stk. 3.* Børn kunnu ikki verða flutt í bili í barnastóli, ið vendur aftureftir, á

einum sæti, sum hevur stoytkodda frammanfyri, um ikki stoytkoddin er gjørdur óvirkin.
*Stk. 4*. Tá koyrt verður í bussi skulu børn, sum eru 3 ár og eldri, og sum eru undir 135 cm nýta trygdarbelti ella aðra góðkenda trygdarútgerð, í tann mun sætið hevur hetta, sbr. tó stk. 5.
*Stk. 5*. Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um nýtsluna av trygdarútgerð, tá børn undir 135 cm verða flutt, heruppií um, at stk. 1, 2 og 4 heilt ella lutvíst ikki skulu nýtast.
*Stk. 6*. Bilførarin skal ansa eftir, at reglurnar í stk. 1-4 og reglur ásettar sambært stk. 5 verða hildnar. Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at bussførari heilt ella lutvíst kann sleppa undan teirri í 1. pkt. nevndu skyldu, og um hvørji tiltøk førarin í staðin skal gera.
*Stk. 7*. Til tess at hava eftirlit við, at reglurnar í stk. 1, 2 og 4, og reglur ásettar við heimild í stk. 5, sbr. stk. 6, 1. pkt., verða hildnar, kann løgreglan til eina og hvørja tíð krevja, at eitt barn, ið verður flutt í bili ella á tríhjólaðari motorsúkklu verður mátað og vigað. Løgreglan mátar og vigar barnið.

*Talið á ferðandi, ið lógliga kunnu verða flutt*

**§ 42 b.** Talið á ferðandi á forsetrinum í einum bili, má ikki fara upp um talið á sitiplássum til ferðandi, sum hava trygdarbelti. Ásetingin í 1. pkt. verður at nýta samsvarandi viðvíkjandi flutningi av ferðandi á baksetrinum ella baksetrunum í einum bili.
*Stk. 2*. Ásetingin í stk. 1, 1. pkt. verður ikki at nýta á flutning í bilum, har sitiplássini til ferðandi á forsetrinum ikki hava trygdarbelti. Ásetingin í stk. 1, 2. pkt. verður ikki at nýta á flutning av ferðandi í bilum, har sitiplássini á baksetrinum ella baksetrunum ikki hava trygdarbelti.
*Stk. 3*. Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at stk. 1 ikki skal verða nýtt í serligum førum, heruppií tá flutt verða ferðandi, sum sambært reglum ásettar sambært § 42, stk. 3, og § 42 a, stk. 5, sleppa undan at nýta trygdarútgerð, og tá talan er um serstøk sløg av koyring.
*Stk. 4*. Tann ferðandi hevur skyldu til at ansa eftir, at ásetingin í stk. 1 og reglur ásettar sambært stk. 3, verða hildnar. Fyri ferðandi, ið ikki eru fylt 15 ár, skal førarin tó síggja til, at reglan í stk. 1 og reglur ásettar sambært stk. 3, verða hildnar.

*Fallhjálmar*

**§ 42 c.** Førari av tvíhjólaðari motorsúkklu, ella av motorsúkklu við síðuvogni, og av prutli og øll ferðandi, sum fylt eru 15 ár, skulu meðan koyrt verður nýta fastspentan fallhjálm við hjálmglugga. Um fallhjálmur ikki hevur hjálmglugga skulu verndarbrillur nýtast.
*Stk. 2*. Førarin skal síggja til, at hvør, sum við er, ið hevur fylt 8 ár, men enn ikki 15 ár, er í fastspentum fallhjálmi við hjálmglugga. Um fallhjálmur ikki hevur hjálmglugga skulu verndarbrillur nýtast.
*Stk. 3*. Skyldan til at nýta fallhjálm geldur ikki, meðan koyrt verður á bilaplássi, tænastustøð, verkstaðarrúmi ella í líkum umstøðum.
*Stk. 4*. Landsstýrið kann seta reglur um undantøkur frá skylduni at nýta fallhjálm.”

**23)** Í § 43 verður sum stk. 5 sett:
”*Stk. 5*. Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta reglur um trygdarbúna og aðra útgerð hjá førara og ferðandi á motorsúkklu og í síðuvogni hennara.”

**24)** § 44, stk. 2, verður orðað soleiðis:
“*Stk. 2*. § 45, stk. 2 og 3, um pláss á vegnum og koyring um krossveg, er eisini galdandi fyri prutl, tó soleiðis, at

um prutl skal sneiða til vinstru á krossvegi við meira enn einari farbreyt, har tann eina er til sneiðing til vinstru, kann prutlið stilla seg mitt í hesi farbreyt. Prutlið skal tá sneiða soleiðis, at tá tað fer av krossvegnum, skal tað vera statt høgrumegin á teirri akbreyt, ið tað sneiðir inn á. § 29 b, stk. 2, er galdandi, tá sneitt verður til vinstru."

**25)** § 58, verður orðað soleiðis:

**"§ 58.** Rúsdrekkakoyring við motorakfari, traktori ella motoramboði og brot á § 15, stk. 1 ella 2, verður revsað við sekt, sbr. tó stk. 2.
*Stk. 2.* Revsingin eftir stk. 1 kann hækka til hefti ella fongsul í 1 ár og 6 mánaðir, um
1) alkoholstyrkin meðan koyrt verður ella aftaná hevur verið oman fyri 2,00 promillu í blóðinum ella oman fyri 1,00 mg pr. litur luft í útandingarluftini. Sama er galdandi í ella aftaná tíðarbilið, sum nevnt er í § 16, stk. 1, 2. pkt. um alkoholstyrkin í blóðinum er farin upp um 2,00 promillu ella er farin upp um 1,00 mg pr. litur luft í útandingarluftini,
2) førarin undir serliga herðandi umstøðum hevur brotið § 15, stk. 2,
3) førarin verður funnin sekur í fleiri tilburðum av rúsdrekkakoyring ella broti á § 15, stk. 1 ella 2,
4) førarin áður er dømdur at missa koyrirættindini treytað vegna rúsdrekkakoyring ella brot á § 15, stk. 1 ella 2, og nýggi tilburðurin er framdur innan 3 ár eftir, at fyrra avgerðin varð endalig,
5) førarin áður hevur fingið koyriforboð sambært § 59 h vegna rúsdrekkakoyring ella brot á § 15, stk. 1 ella 2, og nýggja brotið er framt innan 3 ár eftir, at avgerðin um koyriforboðið varð endalig,
6) førarin áður er dømdur at missa koyrirættindini treytaleyst vegna rúsdrekkakoyring ella brot á § 15, stk. 1 ella 2, og nýggja brotið er framt innan 5 ár eftir, at frátøkutíðin er úti,
7) rúsdrekkakoyring ella brot á § 15, stk.1 ella 2, er farið fram við óheimilaðari nýtslu av einum motorakfari, einum traktori ella einum motoramboð, sbr. § 293, stk. 1, í revsilógini.
8) førarin verður funnin sekur í tilburði, ið er fevndur av § 59 a, stk. 1, nr. 1, nr. 3, nr. 4 ella nr. 5.
*Stk. 3.* Rúsdrekkakoyring við prutli verður revsað við sekt. Er hin seki áður dømdur fyri rúsdrekkakoyring, kann revsingin hækka til hefti ella fongsul í upp til 1 ár.
*Stk. 4.* Brot á § 18, stk. 1, § 18 a, stk. 1 og stk. 4, og § 26, stk. 1, verður revsað við sekt, ella um umstøðurnar eru herðandi, við hefti ella fongsli í upp til 1 ár.
*Stk. 5.* Tann, sum koyrir motordrivið akfar, sum koyrikort krevst til, hóast viðkomandi treytaleyst er frádømdur rættin til at vera ella gerast førari á tílíkum akfari, verður revsaður við sekt. Revsingin kann hækka til hefti ella fongsul í 1 ár og 6 mánaðir, um førarin
1) verður funnin sekur í koyring í fleiri førum í frádømingartíðini, ella
2) áður er revsaður fyri koyring í frádømingartíðini.

*Stk. 6.* Sektir sambært stk. 1, verða ásettar við atliti at inntøkuviðurskiftunum hjá viðkomandi, tá brotið varð framt. Tá støddin á sektini fyri rúsdrekkakoyring verður ásett, skal fyrilit eisini verða tikið fyri alkoholpromilluni í blóðinum ella í útandingarluftini meðan koyrt verður ella aftaná.
*Stk. 7.* Sektir sambært stk. 5, verða ásettar við atliti at inntøkuviðurskiftunum hjá viðkomandi, tá brotið varð framt. Sama

er galdandi fyri sektir, ið sambært § 58 í revsilógini verða givnar í sambandi við treytaða fongsulsrevsing ásett sambært stk. 2, ella stk. 5.
*Stk. 8.* Frávik kann verða gjørt frá ásetingunum í stk. 6 og 7, um serligar grundir tala fyri tí.

**26)** Í § 58 a, stk. 1, nr. 1, verður “§ 36, stk. 1-3” broytt til “§ 36, stk. 1-4”. Harumframt verða strikað orðini “§ 42, stk. 1 og stk. 6, § 42 a, stk. 1-2”og í staðin verður sett: “§ 42, stk. 1 og 4, § 42 a, stk. 6, § 42 b, stk. 4, § 42 c, stk. 1-2”

**27)** Í § 58 a, verður aftaná stk. 8 sett:
“*Stk. 9.* Sektir fyri brot á hesa lóg og fyri brot á reglur, givnar sambært lógini, verða ásettar til upphæddir, sum kunnu býtast við 500 kr., sbr. tó stk. 2.
*Stk. 10.* Sektir til persónar við serliga lágari inntøku kunnu ásetast til upphæddir, ið ikki kunnu býtast við 500 kr. Slíkar sektir kunnu tó ikki ásetast til upphædd undir 300 kr.
*Stk. 11*. Hevur nakar við einari ella fleiri gerðum brotið hesa lóg ella reglur givnar við heimild í hesi lóg, og verða brotini revsað við sekt, verða sektirnar fyri hvørt brotið lagdar saman. Hevur nakar við einari ella fleiri gerðum brotið hesa lóg ella reglur givnar við heimild í hesi lóg og eina ella fleiri aðrar lógir, og verða brotini revsað við sekt, verða sektirnar fyri hvørt brotið á hesa lóg ella reglur givnar við heimild í hesi lóg lagdar saman við sektunum fyri brot á hina ella hinar lógirnar.
*Stk. 12.* Hevur nakar við einari ella fleiri gerðum brotið hesa lóg ella reglur givnar sambært lógini, og verður eitt av brotunum revsað við hefti ella fongsul, meðan eitt annað brot verður revsað við sekt, dømir rætturin eina sekt umframt hefti ella fongsulsrevsing. Sama er galdandi, um nakar við einari ella fleiri gerðum hevur brotið hesa lóg ella reglur givnar við heimild í hesi lóg og eina ella fleiri aðrar lógir og brotið á hesa lóg ella reglur givnar sambært hesi lóg verður revsað við sekt og brotið á hina ella hinar lógirnar verður revsað við hefti ella fongsulsrevsing.
*Stk. 13.* Vikið kann verða frá reglunum í stk. 11 og 12, tá serligar grundir tala fyri tí.”

**28)** Í § 58 g, stk. 1, verða orðini ”rúsdrekka- ella promillukoyring” broytt til ”rúsdrekkakkoyring”

**29)** Í yvirskriftini yvir § 59 verða orðini ”rúsdrekka- og promillukoyring” broytt til: ”rúsdrekkakoyring”.

**30)** § 59 verður orðað soleiðis:
“§ 59. Rætturin til at koyra motordrivið akfar, sum koyrikort krevst til, tó ikki prutl, skal frádømast førara av slíkum akfari treytaleyst, um hann hevur gjørt seg sekan í rúsdrekkakoyring og alkoholstyrkin í blóðinum er hægri enn 0,80 promillu ella alkoholstyrkin í útandingarluftini er hægri enn 0,40 mg pr. litur luft.”

**31)** Í § 59 a, stk. 1, verður nr. 2 orðað soleiðis:
”2) hann hevur gjørt seg sekan í rúsdrekkakoyring, og alkoholstyrkin í blóðinum er hægri enn 0,50 promillu, ella alkoholstyrkin í útandingarluftini er hægri enn 0,25 mg pr. litur luft.”

**32)** Í § 59 a, stk. 1, verður aftaná nr. 5, sum nýtt nummar sett:
”6) hann hevur framt brot á § 15, stk. 1, ella framt brot á § 15, stk. 2, sum ikki er fevnt av § 59 a, stk. 2, nr. 5.

Nr. 6 verður hereftir nr. 7.

**33)** Í § 59 a, stk. 2, verður aftaná nr. 4, sum nýtt nummar sett:
”5) undir herðandi umstøðum hevur framt brot á § 15, stk. 2,”

Nr. 5-7 verða hereftir nr. 6-8.

**34)** Í § 59 a, stk. 4, nr. 1, verða strikað orðini “§ 42, stk. 6, § 42 a, stk. 2”, og í staðin verður sett: “§ 42, stk. 4, § 42 a, stk. 6, § 42 b, stk. 4, § 42 c, stk. 2”

**35)** Í § 59 a, stk. 4, verður nr. 2 orðað soleiðis:
”2) § 24, stk. 1 og 2, um brotið umfatar, at koyrt er fram, hóast ljóssignalið er reytt, at koyrt er móti ferðsluleiðini, ella at farið er yvir um hindrunarstikur,”.

**36)** § 59 b, verður orðað soleiðis:

”**§ 59b.** Treytaleys frádøming verður gjørd fyri eitt tíðarskeið uppá millum 6 mánaðir og 10 ár, sbr. tó stk. 2 og 3.
*Stk. 2.* Treytaleys frádøming fyri rúsdrekkakoyring við eini promillu uppá omanfyri 1,20 promillu í blóðinum, ella 0,60 mg pr. litur luft í útandingarluft, ella fyri brot á § 15, stk. 2, ið er fevnt av § 59 a, stk. 2, nr. 5, og er dømt at geva treytaleysa frádøming, verður gjørd fyri eitt tíðarskeið, sum í minsta lagi er 3 ár.
*Stk. 3.* Frádømingin kann verða gjørd fyri alla tíð, um førarin undir koyringini hevur framt groft koyrimistak, koyringin hevur elvt til álvarsaman persónsskaða og slíkar upplýsingar eru um brot, sum førarin áður hevur framt á ferðslulógina, at ein frádøming av førarарættinum fyri alla tíð verður mett neyðug við fyriliti fyri ferðslutrygdini og rættarverjuni.”

**37)** § 59 f, stk. 2,verður strikað.
Stk. 3 verður hereftir stk. 2.

**38)** Í § 59 f, stk. 3, ið verður stk. 2, verða orðini: “og 2” strikað.

**39)** Í § 59 h verður aftaná orðini ”er gjøgnumførd” sett inn: ” ella luttikið er í R/F-skeiði, sbr. § 18 d, stk. 1 og 2,”

**§ 2**

Lógin kemur í gildi 1. juli 2009, sbr. tó stk. 2.
*Stk. 2.* Hóast ásetingina í stk. 1 kann til 1. januar 2012 verða flutt eitt størri tal av ferðandi á baksetrinum ella baksetrunum í persónbilum, enn tað er tal á sitiplássum, ið hava trygdarbelti.

**Kap. 1. Almennar viðmerkingar**

Í juni 2007 setti landsstýrismaðurin í vinnumálum ein bólk at gera eina Ferðslutrygdarætlan fyri Føroyar, ið skuldi vísa, hvussu tað kundi komast nærri nullhugsjónini, sum stendur í endamálsorðingini í ferðslulógini, ið sigur, at eingin skal doyggja ella fáa álvarsligt mein av ferðsluvanlukku. Í bólkinum vóru umboð fyri allar avvarðandi partar, og byggir hetta lógaruppskot í stóran mun á tey tilmæli um ferðslutrygd, sum eru lýst í Ferðslutrygdarætlanini frá november 2007.

Umframt aðrar broytingar varð í Ferðslutrygdarætlanini eisini mælt til, at markið fyri rúsdrekkakoyring varð sett til 0,2 promillu, eins og tað er gjørt í m.a. Noreg í 2001 og

Svøríki í 1990. Landsstýrið hevur tó ikki mett, at tað við verandi kanningum á økinum "Från 0,5 til 0,2 promille" (BRÅ-PM 1996:3), "Rattfylleri" (BRÅ-rapport 1998:7) og "Lavere promillegrense – mindre promillekjøring?" (TØI rapport 530/2001) ber til heilt greitt at staðfesta, at úrslitið av eini lækking av promillumarkinum hevur við sær, at talið á álvarsomum ferðsluvanlukkum minkar, og verður promillumarkið tí ikki broytt.

**Gongdin á ferðsluøkinum tey seinastu árini**

| | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Skrásett akfør pr. 31/12 | 22.294 | 24.157 | 25.249 | 26.435 | 28.362 | 30.151 |
| Meldaði ferðsluóhapp samlað | 1.179 | 1.198 | 1.089 | 1.017 | 1.056 | 914 |
| av hesum við persónskaða | 47 | 65 | 74 | 56 | 77 | 50 |
| av hesum við materiellum skaða við politirapport | 261 | 194 | 189 | 178 | 193 | 154 |
| av hesum við materiellum skaða uttan politirapport | 871 | 881 | 826 | 783 | 786 | 710 |
| Skuldsetingar samlað fyri brot á ferðslulógarinnar | | | | | | |
| § 15 (heilivágur v.m.) og § 16 rúsdrekka- og promillukoyring | 159 | 194 | 168 | 160 | 180 | 195 |
| av hesum við ferðsluóhappi við persónskaða | 9 | 15 | 19 | 11 | 11 | 10 |
| av hesum við ferðsluóhappi uttan persónskaða | 38 | 42 | 41 | 31 | 47 | 42 |
| av hesum uttan ferðsluóhapp | 112 | 137 | 108 | 118 | 122 | 143 |
| Onnur brot á ferðslulógina (skuldsettir persónar) | 1.960 | 2.900 | 2.854 | 3.686 | 1.579 | 2.540 |

Kelda: heimasíðan www.politi.fo

Talan er í hesum uppskoti um 8 høvuðsbroytingar:

**1.** Ein broyting er, at sett verður **null-mark** fyri tilvitsávirkandi evnum ella **rúsevnum**. Tað er staðfest, at um førari er ávirkaður av rúsevnum, so økir hetta munandi um vandan fyri ferðsluvanlukkum. Serstakliga verður vandin øktur, um rúsevni verða tikin saman við rúsdrekka. Talan er um ein vaksandi trupulleika.
Í sambandi við rúsdrekkakoyring, verður blóðroynd tikin, ið vísir, hvussu stór alkoholstyrkin í blóðinum er, og fer hon upp um ta í lógini ásetta markið, kann persónurin ákærast fyri brot á ferðslulógina. Ein blóðroynd kann eisini vísa, um

persónur hevur í sær rúsevni, men sambært galdandi lóg kann hann, hóast hann hevur rúsevni í blóðinum, ikki dømast uttan so, at tað við nærri kanningum verður prógvað, at hann ikki hevur verið førur fyri at koyra akfarið, og tað kann vera trupult.
Tað er ikki á líknandi hátt sum við rúsdrekkapromillu gjørligt at seta eitt mark fyri, nær tey ymisku rúsevnini ávirka førararaevnini, og tí verður skotið upp, at als onki rúsevni verður góðtikið, og er hetta eisini ein greiður boðskapur. Samstundis skal revsingin fyri at koyra, tá ein hevur tikið rúsevni, líkjast revsingini fyri at koyra ávirkaður av rúsdrekka, eins og virknaðurin av endurtøku skal verða tann sami, sum tá talan er um rúsdrekka.
Í Danmark, Svøríki og Noreg er sett null-mark fyri rúsevnum.

**2.** Ein broyting er, at støddirnar av **alkoholstyrkini í útandingarluft** verða settar í lógina, og kann hetta nýtast sum prógv í rúsdrekkamálum. Higartil hevur løgreglan havt heimild til at krevja útandingarroynd fyri at meta, um neyðugt er at taka blóðroynd fyri at staðfesta, at brot er framt á ferðslulógina. At neyðuga kanningin nú kann gerast einans við einari útandingarroynd, er eitt nógv minni inntriv enn ein blóðroynd, eins og tað slepst undan at skula bíða eftir úrslitinum av blóðroyndini.
Til tess at staðfesta hvussu stór alkoholstyrkin í útandingarluft er, verður nýtt eitt próvalkometur, ið er eitt tól, sum við stórum neyvleika kann máta alkoholstyrkina. Í Danmark, har henda regla er komin í gildi, skulu próvalkometrini sum minstakrav lúka tey tilmæli, sum altjóða felagsskapurin fyri legalari metrologi (OIML) setur.
Landsstýrismaðurin hevur í § 16 a, stk. 3, heimild til at áseta reglur um krøv til próvalkometur.
Hóast útandingarluft nú kann nýtast sum prógv í rúsdrekkamálum, verður tað tó neyðugt framhaldandi at kunna taka blóðroynd, tí tað fara at vera føri, har førarin vegna sjúku ikki megnar at gera útandingarroynd (t.d. astma) ella um talan er um ferðsluóhapp og førarin er uttan vit.
Umframt at kunna krevja útandingarroynd, fær løgreglan heimild til at taka **sveitta- ella spýttroynd ella at kanna eyguni** hjá viðkomandi, fyri skjótt at kunna staðfesta, um grundarlag er fyri illgruna um, at viðkomandi er ávirkaður av rúsevnum. Tað er sostatt ikki neyðugt, at har er ein grundaður illgruni um rúsdrekka ella rúsevni fyri at gera hesar kanningar, sum verða gjørdar á staðnum. Um mett verður, at viðkomandi er ávirkaður av rúsevnum, kann hann verða tikin við á støðina, har blóðroynd kann verða tikin, eins og higartil. Hetta tí enn er ongin annar háttur tøkur, sum kann nýtast í einum sakarmáli sum prógv um innihald av rúsevnum í kroppinum.

**3.** Ein broyting er, at **markið millum promillukoyring og rúsdrekkakoyring** verður strikað, og verður alt sum nú er oman fyri 0,50 promillu nevnt rúsdrekkakoyring. Tó verður revsingin framhaldandi gjørd í stigum. **Sektirnar** fyri rúsdrekkakoyring, verða nú ásettar við atliti at inntøkuviðurskiftunum hjá viðkomandi, umframt støddini á alkoholpromilluni.

**4.** Ein broyting er, at um persónur hevur mist koyrirættindini **treytað** vegna rúsdrekkakoyring, so verður krav sett um skeið í rúsdrekka og ferðslu (**R/F-skeið**).

Soleiðis verður strammað upp á økinum, og er ætlanin at skerpa tilvitanina um, at rúsdrekka og ferðsla als ikki hoyra saman.

**5.** Ein broyting er, at tíðarskeiðið sum **treytaleys frádøming** kann verða givin fyri, verður longt úr minst 2 ár og 6 mánaðum upp til **3 ár**, tá talan eru um, at persónur hevur havt meira enn 1,20 promillu í blóðinum í førinum fyrstu ferð, í mun til higartil 2,0 promillu. Eisini verður reglan strikað, har rúsdrekkamisnýtarar skulu kunna fáa koyrikortið skjótari aftur enn onnur, um teir fara í viðgerð fyri rúsdrekkamisnýtslu. Nú reglurnar verða herdar, verður ikki mett, at tað frá einum líkskaparsjónarmiði er hóskandi, at persónar, ið hava tørv á rúsdrekkaviðgerð, kunnu fáa førararættin aftur nógv skjótari enn onnur, ið ikki hava tørv á slíkari viðgerð.

**6.** Ein broyting er, at revsingin fyri m.a. brot á reglurnar um koyring ávirkaður av rúsdrekka ella rúsevnum  ella brot á føraraevnikravið verða herdar, og skal revsiramman viðvíkjandi broti á reglurnar í § 15, stk. 1 og 2, samsvara revsirammuni fyri rúsdrekkakoyring. Undir herðandi umstøðum kann revsingin hækka upp til fongsul í **1 ár og 6 mánaðir**, móti higartil 1 ár. Herðandi umstøður eru m.a. um alkoholstyrkin í blóðinum fer upp um 2,0 promillu ella samsvarandi 1,0 mg pr. litur luft í útandingarluft. Viðvíkjandi broti á føraraevnikravið í § 58, stk. 2, nr. 2, verður mett, at umstøðurnar eru serliga herðandi, um førarin í einari kliniskari kanning verður mettur ávirkaður í miðal mun ella meira.

**7**. Ein broyting er, at tillagingar verða gjørdar fyri **traktorar** í sambandi við typugóðkenningina. Rættingar verða gjørdar í ferðslureglum, eins og tað verða gjørdar **ferðslutrygdarligar** broytingar soleiðis, at tað verður bannað at hava ferðafólk í last- ella vørurúmi, og at reglurnar um trygdarbelti og fallhjálm á motorsúkklum verða herdar.

**8.** Ein broyting er, at **sektirnar** á ferðslulógarøkinum verða hækkaðar og gjørdar einfaldari soleiðis, at tær skulu kunna býtast við 500 kr. Sostatt verður talið á gjøldum, sum talan kann verða um, minkað munandi. Eisini verður skotið upp, at sektir innan ferðslulógarøkið verða **lagdar saman**, soleiðis, at verða framd fleiri ymisk brot, so verða sektirnar lagdar saman við fullari upphædd. Somuleiðis verður mælt til at sektirnar innan ferðslulógarøkið verða tær somu sum í Danmark (sbr. Rigsadvokatens meddelelse om sanktionsfastsættelse i færdselssager).

Av tí at danska og føroyska ferðslulógin í stóran mun eru eins, hava donsk lógaruppskot og viðmerkingar verið nýttar í sambandi við tilevningina av lógaruppskotinum, og merkir hetta, at donsk álit og viðmerkingar kunnu nýtast sum grundarlag í tulkingarstøðum eins og fyrisitingarlig praksis kann verða nýtt. Tey álit og viðmerkingar, ið talan serstakliga hevur verið um eru: Lov nr. 524/2007 (Alkoholkoncentration i udåndingsluft, nulgræse for euforiserende stoffer m.v.), Lov nr. 303/2006 (Sikkerhedsudsstyr, ....), Lov nr. 363/2005 (Sanktionsfastsættelse i sager om

spirituskørsel m.v.) og Betænkning nr. 1448/2004 (Sanktioner for spirituskørsel og kørsel i frakendelsestiden).

## Kap. 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 1. Fíggjarligar avleiðingar

### a) Fyri landið

Uppskotið kemur ikki at hava fíggjarligar avleiðingar fyri landið ella landsstovnar. Tað verða løgreglan og Fútin, sum eru ríkismyndugleikar og sum í størsta mun koma at hava eftirlit við uppskotnu broytingunum og gera neyðugu íløgurnar í útgerð til eftirlitið. Tað kann tó roknast við, at inntøkurnar av sektum til ríkiskassan fara at økjast.

### b) Fyri kommunurnar

Uppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

### c) Fyri ávísar samfelagsbólkar

Uppskotið kann hava fíggjarligar avleiðingar fyri persónar, sum verða dømdir fyri m.a. rúsdrekkakoyring eftir uppskotinum. Við tað at sektirnar hækka og verða lagdar saman, kemur uppskotið eisini at hava fíggjarligar avleiðingar, fyri teir persónar sum fremja brot á ferðslulógina.

Sjálvt um reglurnar um trygdarbelti verða herdar, so at tað ikki verður loyvt at hava fleiri persónar í einum bili enn trygdarútgerð er til, verður ikki mett, at hetta hevur fíggjarligar avleiðingar fyri familjur við børnum, við tað at tey fáa freist til 1. januar 2012, at skifta út sín bil og trygdarútgerð til børn, so tey lúka trygdarkrøvini.

### 2. Umsitingarligar avleiðingar

Uppskotið kemur ikki at hava øktar umsitingarligar avleiðingar.

### 3. Umhvørvisligar avleiðingar

Uppskotið hevur ikki umhvørvisligar avleiðingar.

### 4. Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur

Uppskotið hevur ongar avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur.

## 5. Sosialar avleiðingar

Endamálið við hesum uppskoti er, at færri skulu doyggja í ferðsluni. Tað at revsingin hækkar og reglurnar um frádøming verða herdar fyri rúsdrekkakoyring og koyring ávirkaður av rúsevnum, fer væntandi at hava tað jaligu ávirkan, at færri álvarssom óhapp við persónskaða og deyðum verða í ferðsluni.

| | Fyri landið /landsmyndugleikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar /felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar /búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Ja | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða reglur og avtalur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | Nei | |

## Kap. 3. Serligar viðmerkingar

**Til § 1**

**Til nr. 1:**
**Til § 2, III, B:**
Sambært § 2, III, B í ferðslulógini, kunnu traktorar koyra í mesta lagi 30 km/t, og tað er ikki ætlanin, at teir við hesi lógarbroyting skulu kunna koyra 40 km/t. Talan er um eina tillaging til ES-rættin, soleiðis at teir eru tillagaðir ES-typugóðkenningini.

Eisini verður skotið upp, at orðingin í § 2, III, B, í ferðslulógini, har traktorar verða allýstir, samstundis verður broytt soleiðis, at orðini: “og bert við størri broyting í tilgerðini kann fáast at ganga skjótari” verða strikað. Hetta hevur við sær, at traktorar kunnu nýta teir frá lastbilum kendu elektronisku ferðavmarkararnar, og soleiðis koyra

við einum lægri snúningstali, tá teir koyra við hámarksferð. Av hesum fæst ein umhvørvisligur fyrimunur (larmur og dálking).

Galdandi mest loyvda ferð hjá traktorum, sum er 30 km/t, verður ikki broytt, samanber eisini § 30 b, stk. 4.

**Til nr. 2:**
**Til § 2, IV:**
Í § 2, IV, hevur mangla allýsingin av ”Viðfestiakfari”, ið fevnir um viðfestivogn, leguvogn og viðfest amboð.
Undir allýsingini av viðfestivogni verður ”bulvognur” strikað, og undir ”Leguvognur” verða strikað orðini: “Sum viðfestur vognur ella leguvognur verður tó ikki annað akfar at skilja, sum drigið verður av motordrivnum akfari.”, tá mett verður, at tey ikki geva nakra meining.

Undir “Viðfest amboð” er skoytt uppí í endanum, at ein húsvognur er viðfest amboð. Higartil hevur allýsingin av einum húsvogni manglað í ferðslulógini.

Tað sum stendur undir ”Síðuvognur” er óbroytt.

**Til nr. 3:**
**Til yvirskriftina yvir § 15:**
Broytingin av yvirskriftini er ein fylgja av, at § 15 nú eisini ásetir, at persónur, ið førir ella roynir at føra motordrivið akfar ikki skal hava í sær evni, ið ávirka tilvitið.

**Til nr. 4:**
**Til § 15:**
§ 15, stk. 1, er nýtt, meðan § 15, stk. 2, er higartil galdandi § 15, stk. 1.

Í Ferðslutrygdarætlanini frá 2007 verður mælt til, at null-mark verður sett fyri rúsandi evnum, tí tað verður mett eins vandamikið og ábyrgdarleyst at koyra við rúsevnum í kroppinum, sum við alkoholi.

Lógarbroytingin hevur við sær, at tað er bannað at koyra motordrivið akfar, um tað eru evni í blóðinum, ið hava ávirkan á tilvitið. Ætlanin er, at landsstýrismaðurin í kunngerð skal áseta, hvørji evni eru bannað. Tað verður við hesum sett eitt nullmark fyri viðkomandi evni, og skal ikki í nøkrum føri takast støða til, um evnini hava ávirkan á koyrievnini hjá viðkomandi. Sama áseting varð sett í gildi í Danmark við lóg nr. 524 frá 24. okt. 2007.

Í sambandi við, at reglur verða gjørdar við heimild í § 15, stk. 1, har ásett verður, hvørji evni verða flokkað sum vandamikil fyri ferðslutrygdina, verður ásett eitt mark fyri, hvat skal metast sum ein bagatell (sonevnd cut off-virði), sum tryggjar, at viðkomandi innan blóðroyndin verður tikin, í eitt ávíst tíðarskeið hevur havt slík evni  í blóðinum, ið ávirkað tilvitið. Endamálið við bagatellmarkinum, er at tryggja, at ongin verður dømdur fyri brot á nullmarkið, um talan er um eina heilt lítla tilvildarliga styrki av viðkomandi evni í blóðinum. Uppskotið hevur sostatt við sær, at nullmarkið fevnir um virkin evni, sum hava eina ávirkan á tilvitið. Evnini skulu vera í blóðinum í einari mongd, ið liggur

omanfyri bagatellmarkið, sum verður nýtt fyri viðkomandi evni, og eina møguliga óvissu í mátingini.
Til grundar fyri uppskotinum verður lagt, at evni, sum eru bannað at hava sambært lóg um rúsevni, sum útgangsstøði verða mett at vera vandamikil fyri ferðslutrygdina. Sambært uppskotinum, fer landsstýrismaðurin við tilvísing í kunngerð til lógina um rúsevni, at kunna gera av, hvørji evni eru vandamikil fyri ferðslutrygdina. Ein slík tilvísing fer sjálvvirkið at fevna um tey evni, sum í framtíðini fara at verða bannað sambært lóg um rúsevni. Eisini verður møguligt at nágreina hvørji evni skulu ella ikki skulu vera fevnd av nullmarkinum. Galdandi kunngerð er "Bekendtgørelse nr. 698 af 31. august 1993 om euforiserende stoffer" sum seinast broytt við "bekendtgørelse nr. 368 af 22. maj 2008", og er við heimild í ferðslulógini í Danmark givin kunngerð (Bekendtgørelse nr. 655 af 19. juni 2007) um flokking av evnum, ið eru vandamikil fyri ferðslutrygdina.

Sambært uppskotinum fevnir bannið ikki um evni, sum viðkomandi hevur tikið sambært og í samsvari við eina lógliga ávísing td. frá lækna ella tannlækna. Hetta hevur við sær, at persónar, ið hava tikið evni, sum verða mett sum vandamikil fyri ferðslutrygdina, ikki eru fevndir av regluni, sum er skotin upp, um hetta er eftir læknaligari fyriskipan. Persónur, sum roynir at føra ella sum førir motordrivið akfar við slíkum evni í blóðinum, brýtur ikki ásetingina. Viðkomandi fer tó at kunna verða revsaður, um hann vegna tað, at hann hevur tikið eitt evni, ikki er førur fyri at føra akfarið á tryggan hátt, sbr. § 15, stk. 2, sum higartil hevur verið § 15, stk. 1. Um viðkomandi hinvegin tekur eitt annað evni, enn tað sum læknin hevur ávíst, ella eina størri mongd, enn hann hevur ávíst, so fer hetta at koma undir regluna í § 15, stk. 1.

**Til nr. 5**
**Til yvirskriftina yvir § 16:**
Yvirskriftin "Rúsdrekkakoyring v.m." verður sett, tí mett verður, at her hevur manglað ein yvirskrift. Í galdandi lóg stendur rúsdrekkakoyring undir kapitlinum "Sjúka, overving v.m.", sum nú verður broytt til "Tilvitsávirkandi evni, sjúka, overving v.m.

**Til nr. 6-9**
**Til § 16, stk. 1-3:**
Við lógarbroytingini verður uppbýtið millum rúsdrekkakoyring og promillukoyring strikað, og verður nú alt nevnt rúsdrekkakoyring. § 16, stk. 3, ið er um promillukoyring verður sostatt strikað.

Hóast promillumarkið uppá 0,51 verður varðveitt, skal tað, at alt nú verður nevnt rúsdrekkakoyring vísa á, at heldur ikki ein lítil alkoholpromilla verður góðtikin í sambandi við koyring, tí hon økir um vandan fyri ferðsluvanlukku. Alkoholið doyvir sansirnar og reaktiónsevnini vikna og rúsdrekka og ferðsla hoyra sostatt ikki saman.

Harafturat verður ásett, at javnstillað við promillu í blóðinum verður alkoholstyrki í útandingarluft, og merkir hetta, at alkoholstyrkin í útandingarluft nú kann nýtast sum prógv í rættarmálum. Henda lógarbroyting varð sett í gildi í Danmark við lóg nr. 524 frá 6. juni 2007.

Lutfallið millum alkoholstyrki í blóðinum og alkoholstyrki í útandingarluft er 2000:1, og svarar ein alkoholstyrki í blóðinum upp á 0,50 promillu til eina alkoholstyrki í útandingarluft upp á 0,25 mg pr. litur luft.

Við promillu í blóðinum verður síðustillað alkoholstyrki í útandingarluft og lutfallið er 2.000:1.
Tvs. at lutfallið er hetta:

| Alkoholpromillu í blóðinum | Milligram alkohol pr. litur luft |
|---|---|
| 0,51-0,80 | 0,26-0,40 |
| 0,81-1,20 | 0,41-0,60 |
| 1,21-2,0 | 0,61-1,0 |
| 2,01- | 1,01- |

**Til nr. 10:**
**Til § 16, stk. 4 og 5 (fyrr stk. 5 og 6):**
Í § 16, stk. 4 og 5, verða tær í § 15, stk. 2 (fyrr § 15, stk. 1), nevndu grundir síðustillaðar við ávirkan av rúsdrekka, soleiðis, at tað eisini er bannað persóni at stýra súkklu, hestavogni ella hesti, um viðkomandi er so ávirkaður av rúsdrekka, sjúku, overving, ovvekur ella undir árini av huglættandi ella doyvandi evnum, at hann ikki er førur fyri at gera hetta á tryggan hátt, ella at sleppa persóni, ið er soleiðis ávirkaður, at gera tað.

**Til nr. 11**
**Til § 16 a, stk. 1:**
Sambært galdandi áseting kann løgreglan krevja at førari ger útandingarroynd. Henda hevur fyrst og fremst verið nýtt til at meta, um blóðroynd skal takast av viðkomandi. Við broytingini í § 16, stk. 1, kann alkoholstyrkin í útandingarluft nú nýtast sum prógv í rúsdrekkamálum, og hevur løgreglan við hesum heimild til, til eina og hvørja tíð at krevja, at førari ger útandingarroynd, sum verður nýtt sum prógv í rúsdrekkamáli. At hesar kanningar nú kunnu gerast á staðnum og úrslitið fáast beinanvegin, lættir um bæði hjá førarum og hjá løgregluni, tí neyðugt er ikki, at viðkomandi verður tikin við á løgreglustøðina fyri at fáa blóðroynd tikna, og heldur ikki skal bíðast eftir úrslitinum av blóðroyndini.
Harafturat verður skotið upp, at løgreglan fær heimild til at krevja sveittaroynd ella spýttroynd frá bilførarum og at kanna eyguni á teimum. Hetta skal tryggja, at løgreglan fær eitt grundarlag, so hon kann meta, um blóðroynd skal verða tikin fyri at kunna staðfesta um viðkomandi hevur evni í blóðinum, ið ávirka tilvitið. Hetta kann verða gjørt við sonevndum “snarroyndum”, ið kunnu gerast av fólki, ið ikki hava eina laboratoriufakliga útbúgving. Hesar snarroyndir geva eitt tekin, sum kann vera ein litvísing ella eitt sveiggj á einum mátitóli. Við kanningini av eygunum, er í summum førum gjørligt at síggja, um viðkomandi er ávirkaður av rúsevnum. Tað er ymiskt hvussu tey ymisku rúsevnini ávirka eyguni, og er tí neyðugt at løgreglufólk fáa upplæring í hesum. (Jbr. “Betænkning om alkohol i udåndingsluft og nulgrænse for euroriserende stoffer m.v.”, nr. 1486 frá 2007 hjá danska løgmálaráðnum, s. 121).

Við orðingini av § 16, stk. 1, 1. pkt. verður hildið fast í, at heimildirnar hjá løgregluni sambært ásetingini er ein vanlig heimild til at gera tey likamsinntriv, sum ásetingin

fevnir um. Tað er sostatt ikki neyðugt, at nakar grundaður mistanki er um, at viðkomandi er ávirkaður av rúsdrekka ella rúsevnum. Ætlanin er, at løgreglan skal kunna gera hesar kanningar í sambandi við vanligar kanningar á vegunum. Tá kanningin verður gjørd á staðnum, kann løgreglan krevja, at viðkomandi letur seg kanna í einum serligum bili við mátiútgerð, ella í einum løgreglubili. Um talan er um grundaðan mistanka um rúsdrekkakoyring, kann løgreglan krevja, at viðkomandi gevur útandingarroynd á løgreglustøðini.

**Til nr. 12:**
**Til § 16 a, stk. 2:**
Broytingin er ein fylgja av, at § 16, stk. 3, nú er strikað.

**Til nr. 13:**
**Til § 18, stk. 4:**
§ 18, stk. 4, í ferðslulógini er soljóðandi:
“Stk. 4. Landsstýrismaðurin kann seta eykatreytir og herða treytirnar í stk. 2 fyri at fáa koyrikort til:
1) motorakfar, ið verður nýtt til vinnuligan fólkaflutning,
2) ávísar motorsúkklur,
3) motorakfar, hvørs heildarvekt er yvir 3.500 kg,
4) viðfestivogn til akfør, nevnd í nr. 3.

Tá orðið “viðfestivogn” verður nýtt í § 18, stk. 4, nr. 4, er hetta ein feilur, tí orðið skal vera viðfestiakfar. Viðfestiakfør fevna um viðfestivognar, leguvognar og viðfest amboð, og tískil skal í § 18, stk. 4, nr. 4, standa “viðfestiakfar”, tí ásetingin eigur at fevna um viðfestivogn, viðfest amboð og leguvogn, (sbr. rætting til § 2, IV).

**Til nr. 14 og 15:**
**Til § 18 c, stk. 3.**
Í galdandi ferðslulóg verður sagt, at persónur skal hava “nýggja koyrifrálæru” í sambandi við, at hann hevur mist koyrirættin orsakað av rúsdrekka- ella promillukoyring. Fyri at fáa eina heilt greiða orðing, verður í broytingini greitt tilskilað, at hetta er skeið í rúsdrekka og ferðslu (R/F-skeið).

Eftir at Akstovan hevði ráðført seg við Fyribyrgingarráðið um, hvussu R/F-skeiðið kundi fyriskipast, verður hetta í dag gjørt á tann hátt, at serkønur ráðgevi innan rúsdrekkamisnýtslu gevur koyrilærarum frálæru í rúsdrekka- og ferðslu. Hereftir kunnu teir persónar, sum sambært lógini skulu hava luttikið í R/F-skeiði, fáa slíkt skeið hjá teimum koyrilærarum, sum hava tikið útbúgving, og sum Akstovan hevur góðkent.

Eftir lógarbroytingina verður uppbýtið hetta: Alt sum er yvir 0,5 promillu er rúsdrekkakoyring.
Yvir 0,5 promillu til og við 0,8 promillu: rúsdrekkakoyring, ið gevur treytaða frádøming av koyrikortinum. Krav verður sett um R/F-skeið.
Yvir 0,8 promillu: rúsdrekkakoyring, ið gevur treytaleysa frádøming av koyrikortinum. Krav verður sett um R/F-skeið.

**Til nr. 16:**
**Til § 18 c, stk. 4:**
Við lógarbroytingini verður sum nakað nýtt eisini sett krav um luttøku í R/F-skeiði, tá koyrirætturin er frádømdur treytað vegna rúsdrekkakoyring. Harafturat er “Bileftirlitið” broytt til:”Akstovan”.

Higartil hevur uppbýtið millum rúsdrekkakoyring og promillukoyring verið hetta:
Yvir 0,5 promillu til og við 0,8 promillu: promillukoyring, ið gevur treytaða frádøming av koyrikortinum. Onki krav um skeið í rúsdrekka og ferðslu (R/F-skeið) fyri at fáa koyrikortið aftur.
Yvir 0,8 promillu: rúsdrekkakoyring, ið gevur treytaleysa frádøming av koyrikortinum. Krav um R/F skeið, um koyrikortið skal fáast aftur.

**Til nr. 17:**
**Til § 18 c, stk. 5:**
Her verður gjørd broyting, tí krav nú eisini verður sett um R/F-skeið í sambandi við treytaða frádøming í sambandi við rúsdrekkakoyring.

**Til nr. 18:**
**Til § 18 d:**
Broytingin hevur við sær, at áðrenn persónur, sum hevur fingið koyriforboð vegna rúsdrekkakoyring sambært § 59 a, fær koyrirættindini aftur, so skal hann hava tikið lut í R/F-skeiði.

**Til nr. 19:**
**Til § 18, d, stk. 3 (ið verður stk. 4):**
Her verður ásett, at luttikið skal hava verið í R/F-skeiði, hóast viðkomandi seinri hevur staðið eina nýggja koyriroynd.

**Til nr. 20:**
**§ 33 a, stk. 1, nr. 6:**
Her verður ásett, at steðgur ella parkering er bannað á strekki, har akbreytin framman fyri eitt_vegamót við hindrunarstrikum er løgd sundur í farbreytir, ella 5 m áðrenn eitt slíkt strekki byrjar.

Um akfør standa ov nær hindrunarstrikuni, hevur hetta við sær, at akfar, ið skal koyra fram móti vegamótinum møguliga verður tvungið yvir um strikuna og yvir í skeiva farbreyt. Soleiðis kunnu bilførarar verða tvungnir inn í eina støðu, sum gevur klipp í koyrikortið, sbr. § 59 a, stk. 4, nr. 2, og § 24, stk. 1.

Núgaldandi orðing har sagt verður “ella so nær byrjanini av tílíkum strekki, at hetta tarnar øðrum í innakstri í rætta farbreyt” ger, at her má gerast ein ítøkilig meting í hvørjum einstøkum føri, um hetta tarnar øðrum í innakstri í rætta farbreyt.

Verður ásett, at strekkið er 5 m hevur hetta við sær, at tað verður lættari hjá parkeringsvørðum og løgreglu at umsita lógina og lættari hjá ferðandi at meta um ítøkiligu støðuna.

**Til nr. 21:**
**Til § 36, stk. 3:**
§ 36, sum er galdandi fyri øll akfør, eisini tey, sum hava trygdarbelti á øllum setrum, stendur undir yvirskriftini “Ferming og skipan í akfari”. Sambært hesi grein mugu fólk ella farmur ikki vera soleiðis skipað, at førarin ikki hevur frítt útsýni og nóg góðar atstøður til at handfara stýrisgøgn...., og sambært stk. 2, mugu ferðafólk ikki vera havd við í tílíkum tali ella soleiðis sett, at tað kann vera til vanda fyri tey sjálv ella onnur.”

Ferðslulógin sigur ikki, at allir persónar í einum akfari skulu sita í trygdarbelti, og ber heldur ikki til, at seta slíkt krav, tí tað framhaldandi eru akfør, sum ikki hava trygdarbelti til øll ferðafólk, og sum heldur ikki kunnu fáa trygdarbelti vegna konstruktiónina á bilinum.

Onki bann er móti at hava ferðafólk við í einari last ella í vørurúminum á einum bili. Mett verður, at tað ikki skal henda tað stóra óhappið, so eru hesi fólk í stórum vanda fyri at verða álvarsamt skadd, og tí eigur slíkur flutningur at verða bannaður.

Ætlanin er tó, at landsstýrismaðurin í kunngerð skal áseta reglur, sum loyva koyring í lastum o.s.fr. tá koyrt verður í serligum føri , t.d. í sambandi við, at skúlin endar og líknandi veitsluhald.

**Til nr. 22:**
**Til § 42-§ 42c:**
Nógvar kanningar vísa, at nýtsla av trygdarbelti veruliga munar, tá talan er um deyð í ferðsluni, og ynskiligt hevði verið um øll, sum ferðast í bili, sótu í trygdarbelti. Mett verður tó, at tað ber ikki til at seta eitt slíkt krav, tí eldri bilar hava ikki trygdarbelti, og heldur ikki ber til at gera teir um, tí konstruktiónin loyvir tí ikki. Tað ber ikki til at krevja, at bilar, sum lógliga koyra á vegunum í dag, skulu setast, men verður mælt til at herða krøvini til nýtsluna av trygdarbelti. Reglurnar eru lagaðar eftir tí, sum er galdandi í øðrum londum, tá tað eru ES-reglur, sum liggja til grundar, og eru tær stórt sæð tær somu reglurnar, sum eru settar í gildi í Danmark við lóg nr. 303 frá 19. apríl 2006.

Lógarbroytingin hevur við sær, at § 42, sum higartil hevur fevnt um trygdarútgerð, nú einans fevnir um trygdarbelti, tí reglurnar um trygdarútgerð til børn koma í eina grein fyri seg sjálva (§ 42 a). Harafturat verður ásett, at tað ikki mugu verða fleiri persónar í bilum, sum hava trygdarbelti, enn tað eru sitipláss við trygdarbelti (§ 42 b). Reglur um fallhjálmar, ið higartil hava staðið í § 42 a, verða broyttar, og koma nú at standa í § 42 c.

Skyldan at seta í trygdarbelti á sitiplássum á forsetrinum í pesónbilum, ið eru gjørdir til at flyta í mesta lagi nýggju persónar íroknað føraran (Flokkur M1), og í vørubilum, ið eru gjørdir til flutning av farmi, og sum hava ein loyvda totalvekt upp á í mesta lagi 3.500 kg (flokkur N1), kom í gildi tann 1. juli 1969 fyri akfør, ið eru skrásett eftir henda dag. Við gildi tann 1. apríl 1989 varð hetta krav víðkað til at galda øll sitipláss á setrum, ið venda frameftir, tvs. eisini á baksetrinum. Kravið varð tann 1. oktober 1999 víðkað til eisini at galda fyri sitipláss, ið venda aftureftir. Longu frá 1. apríl 1980 varð tó eisini sett krav um, at øll sitipláss á setrum í persón- og vørubilum skuldu hava beltifesting.

Tann 1. apríl 1998 varð sett krav um, at lastbilar, ið eru gjørdir til farmaflutning, og sum hava eina loyvda heildarvekt uppá meira enn 3.500 kg (flokkur N2 og N3), skulu hava trygdarbelti og beltifesting við øll setur, ið venda frameftir.
Viðvíkjandi bussum við einari loyvdari heildarvekt uppá ikki yvir 3.500 kg (smábussar), varð tann 1. apríl 1993 sett krav um, at hesi akfør skulu hava trygdarbelti og beltifesting við øll sitipláss á forsetrinum. Hetta krav varð tann 1. oktober 2001 víðkað til at galda øll sitipláss á setrum, ið venda frameftir og aftureftir. Viðvíkjandi øðrum bussum í flokki M2, tvs. bussum við einari loyvdari heildarvekt uppá meira enn 3.500 kg, men undir 5.000 kg (minni bussar), og bussar í flokki M3, tvs. við einari loyvdari heildarvekt uppá meira enn 5.000 kg (størri bussar), varð tann 1. oktober 1999 ásett krav um, at hesi akfør skulu hava trygdarbelti og beltifestingar á øllum sitiplássum, bæði teimum sum venda frameftir og teimum, sum venda aftureftir. Kravið um trygdarbelti varð tann 1. oktober 2001 víðkað til eisini at galda øll sitipláss á setrum, sum venda aftureftir.
Krøvini um trygdarbelti og beltifesting í bussum (flokkur M2 og M3) er ikki galdandi fyri bussar, har loyvda talið á standiplássum er 20 pst. ella meira av mest loyvda ferðafólkatali, og sum einans verða góðkendir til rutukoyring.

Reglurnar um fallhjálmar, tá koyrt verður á motorsúkklu, eru tær somu, tó soleiðis, at krav nú verður sett um, at hjálmar skulu hava hjálmglugga, ella um fallhjálmurin ikki hevur hjálmglugga, so skulu ferðandi vera í verndarbrillum. Hetta verður mett at betra um trygdina, kanska serstakliga í vandastøðum, har tað er týdningarmikið at sýnið er gott.

**Til § 42:**
**Trygdarbelti**
Skotið verður upp, at reglurnar um trygdarútgerð til børn, sum higartil hava staðið í § 42, nú verða settar í eina grein fyri seg sjálva.

Sambært galdandi lóg hevur bilførarin skyldu til at ansa eftir, at ferðandi, sum ikki eru fylt 15 ár, nýta trygdarútgerð (§ 42, stk. 4). Sambært § 58 a, stk. 1, nr. 1, verður brot revsað við sekt, og sambært § 59 a, stk. 4, gevur brot á hesa skylduna klipp í koyrikortið. Nú verður skotið upp, at landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at førarin av einum bussi heilt ella lutvíst sleppur undan skylduni, tí tað er torført hjá einum bussførara, at hava hetta eftirlit við børnunum. Í staðin kann í kunngerð verða ásett, hvussu bussførarin skal fyrihalda sær við at upplýsa um trygdarútgerð, við at fylgipersónur kunnar um trygdarútgerð, audiovisuelt, ella við piktogrammum, ið er ein mynd, ið vísir, hvussu trygdarbelti skal nýtast.

**Til § 42 a:**
**Nýtsla av trygdarútgerð til børn**
Sambært galdandi § 42, stk. 3, skulu børn undir 3 ár í staðin fyri trygdarbelti nýta barnastól ella aðra trygdarútgerð tillagað hæddini og vektini á barninum. Børn sum eru fylt 3 ár, men ikki sjey ár kunnu í staðin fyri trygdarbelti nýta barnastól, og saman við trygdarbelti kann selakoddi verða nýttur.

Sambært tí sum nú verður skotið upp í § 42 a, verður tað avgerandi fyri, um barnið kemur undir hesa grein, at tað er undir 135 cm. Annars kemur barnið undir reglurnar í § 42.

Sambært stk. 1, skulu børn, ið eru undir 135 cm, og sum ferðast í persón-, vøru- ella lastbilum, ið hava sæti við trygdarbelti, nýta góðkenda trygdarútgerð, sum er tillagað hædd og vekt barnsins. Tó kann landsstýrismaðurin í kunngerð sambært stk. 5, geva loyvi til undantak frá hesi reglu.

Sambært stk. 2 kunnu børn undir 3 ár ikki ferðast í øðrum bilum enn bussum, um hesir ikki hava sitipláss við trygdarbelti, sum góðkend trygdarútgerð tillagað hædd og vekt barnsins, kann verða sett í. Børn, sum eru 3 ár og eldri, og sum eru undir 135 cm, kunnu í slíkum bilum einans verða flutt á einum øðrum sæti enn forsetrinum.

Í stk. 3 verður ásett, at børn ikki mugu sita í barnastóli, ið vendur aftureftir á einum sæti, ið hevur stoytkodda frammanfyri, uttan so at hesin óvirkin. Orsøkin er, at stórur skaði kann standast av hesum, um óhappið hendir.

Sambært stk. 4, skulu børn, ið koyra í bussi, og sum eru 3 ár og eldri, og undir 135 cm, nýta trygdarbelti ella aðra góðkenda trygdarútgerð, í tann mun sætið hevur hetta.

Í stk. 5 fær landsstýrismaðurin heimild til í kunngerð at áseta reglur um nýtsluna av trygdarútgerð fyri børn undir 135 cm, heruppií, at stk. 1, 2, og 4 heilt ella fyri ein part ikki skulu nýtast.

Sambært stk. 6 er tað eins og í dag førarin, sum skal ansa eftir, at reglurnar um trygdarútgerð verða hildnar. Samanber eisini viðmerkingarnar til § 42.

Í stk. 7, fær løgreglan heimild til at viga og máta børn fyri at kunna staðfesta, at reglurnar um trygdarútgerð verða hildnar.

**Til § 42 b:**
**Talið á ferðandi, ið kunnu verða flutt**
Fyri at herða krøvini til nýtsluna av trygdarbelti, er gjørd ein nýggj § 42 b. Sambært galdandi § 42, stk. 1, er onki til hindurs fyri, at tað eru fleiri ferðandi á forsetrinum ella baksetrinum í einum bili, enn tað eru ísett trygdarbelti í bilinum, tá bert tey trygdarbelti, ið eru ísett verða nýtt, og almennu reglurnar í § 36 um ferming og skipan í akfari verða hildnar.

Sambært nýggju § 42 b, stk. 1, 1. pkt., verður skotið upp, at talið á persónum, ið fluttir verða á forsetrinum í einum bili, ikki má vera hægri enn talið á sitiplássum til ferðandi, ið hava trygdarbelti. Reglan í 1. pkt. verður eisini at nýta fyri flutning av ferðandi á baksetrunum, sbr. stk. 1, 2. pkt.

Reglan er galdandi óansæð, um trygdarbeltini er sett í sjálvboðið, ella vegna lógarkrav, og hevur við sær, at um trygdarbelti eru á forsetrinum, so kunnu einans so nógv ferðandi sita har, sum tað er tal á trygdarbeltum, og eru trygdarbelti á baksetrinum, so kunnu bert so nógv ferðandi sita har, sum tað eru trygdarbelti til.
Men um tað eru trygdarbelti á forsetrinum og ikki á baksetrinum, so er markið fyri, hvussu nógv kunnu sita á baksetrinum, tað sum stendur í § 36 í ferðslulógini um ferming og skipan í akfari.

Ásetingin í stk. 1 hevur við sær, at tað ikki longur verður møguligt hjá familjum, sum telja foreldur og 4 børn, at hava ein vanligan persónbil, ið einans hevur trygdarútgerð til 5 ferðandi.

Sambært stk. 2, kann ikki verða kravt, at ferðandi sita í trygdarbelti á baksetrinum, um einki trygdarbelti er. Sama er galdandi fyri forsetrið soleiðis, at um einki trygdarbelti er til ferðandi, so kunnu ferðandi sita har í ongum belti. Her er tað einans § 36 í ferðslulógini, sum setur markið.

Eftir stk. 3 fær landsstýrismaðurin heimild til at áseta reglur um, at stk. 1 ikki skal nýtast í serligum førum, heruppií tá flutt verða ferðandi, sum sambært reglum ásettar sambært § 42, stk. 3 og § 42 a, stk. 5, eru undantikin skylduni at nýta trygdarútgerð, og tá talan er um serstaka koyring. Her kann t.d. vera talan um læknaligar orsøkir ella serstaka koyring sum t.d. postútbering ella blaðútbering og ávísa koyring hjá løgregluni.

Í stk. 4 verður skotið upp, at ábyrgdin fyri, at reglan í stk. 1, og reglur ásettar sambært stk. 2, verða hildnar, skal liggja á tí ferðandi, tí ein ferðandi kann lættliga síggja, um har er eitt sitipláss við trygdarbelti, sum hann kann nýta, sbr. stk. 4, 1. pkt. Fyri ferðandi undir 15 ár áliggur tað eftir uppskotinum tó framhaldandi føraranum at ansa eftir, at reglurnar verða hildnar, sbr. stk. 4, 2. pkt.

**Til § 42 c:**
**Fallhjálmar**
Reglurnar í § 42 c, eru tær, sum í galdandi lóg standa í § 42 a, burtursæð frá, at fallhjálmar nú skulu hava hjálmglugga, ella at nýttar skulu verða verndarbrillur. Hetta er fyri at verja eyguni t.d. móti steinsløgum og tryggjar at sýnið er so gott sum gjørligt, tá hetta hevur stóran týdning fyri trygdina.

**Til nr. 23:**
**Til § 43, stk. 5:**
Av tí at útgerðin hjá motorsúkklukoyrarum, t.d. ryggstuðul, er sera avgerandi, tá vanlukkur henda, verður mett, at serligar reglur eiga at verða gjørdar á hesum øki. Tá hetta samstundis eru reglur, sum allarhelst eru undir støðugari broyting, so hvørt sum útgerðin verður betrað, og tí at tað enn ikki er so nógv av útgerðini, sum hevur fingið góðkenning, verður mælt til, at landsstýrismaðurin fær heimild til at áseta hesar reglur í kunngerð.

**Til nr. 24:**
**Til § 44, stk. 2:**
Tað er eitt ynski frá koyrilærarum um, at prutl ikki, tá komið verður til ein krossveg, skulu halda seg til høgru eins og súkklur (og soleiðis skulu fara yvir um krossvegin við súkkluni), men kunnu fara í ta farbreyt, sum akfør, ið skulu til vinstru, skulu í. Tá prutlini nú kunnu fara út í farbreytina til vinstrasneiðing, mugu tey vísa sama ansni sum onnur akfør, áðrenn sneitt verður, sbr. § 29, b, stk. 2 (halda aftur fyri mótkoyrandi ferðslu).

**Til nr. 25:**
**Til § 58, stk. 1:**
Sambært § 58, stk. 1, verður rúsdrekkakoyring revsað við sekt, eins og sambært § 58, stk. 1, 1. pkt., í higartil galdandi lóg. Harafturat verður skoytt uppí stk. 1, at síðusstillað við rúsdrekkakoyrig verður koyring ávirkaður av rúsevnum (§ 15, stk. 1) ella koyring, har førarin vegna sjúku, overving v.m. ikki er førur fyri at koyra akfarið, tvs. hann lýkur ikki føraraevnikravið (§ 15, stk. 2). Tað er sambært hesi áseting líkamikið, um rúsevnini í ítøkiliga førinum hava ávirkað førararaevnini ella ikki.
Samstundis sum markið millum promillukoyring og rúsdrekkakoyring verður tikið burtur, soleiðis at alt nú eitur rúsdrekkakoyring, verður skotið upp at herða revsingina fyri rúsdrekkakoyring, og at revsingin fyri rúsevniskoyring v.m. fylgir revsingini fyri rúsdrekkakoyring.

**Til § 58, stk. 2, nr. 1:**
Í § 58, stk. 2, standa herðandi treytirnar í sambandi við koyring sambært stk. 1. Revsingin kann nú hækka til hefti ella fongsul í 1 ár og 6 mánaðir. Hetta merkir, at sambært regluni í § 762, stk. 1, nr. 2, í rættargangslógini, kann ein skuldsettur varðhaldsfongslast, um tað verður mett, at stórur vandi er fyri, at tann skuldsetti, um hann verður latin leysur, fremur sama brot.

Í nr. 1 verður ásett, at um koyrt er við meira enn 2,0 promillu alkoholstyrki í blóðinum, so kann revsingin verða hækkað til hefti ella fongsul 1 ár og 6 mánaðir, í mun til 1 ár í dag. Síðustillað við alkoholstyrki í blóðinum verður alkoholstyrki í útandingarluft. Lutfallið er 2000:1, og verður tí ásett, at talan skal vera um meira alkoholstyrki enn 1,0 mg pr. litur luft í útandingarluft. Tað er líkamikið, um tað í hesum førinum kann staðfestast, um førarin hevur koyrt óforsvarliga ella ikki, tí mett verður, at ein alkoholstyrki upp á 2,0 promillu í blóðinum ella samsvarandi ein alkoholstyrki uppá 1,0 mg pr. litur luft í útandingarluft, er sera vandamikil fyri ferðslutrygdina.

**Til § 58, stk. 2, nr. 2:**
§ 15, stk. 2, er sama regla sum í higartil galdandi § 15, stk. 1, og verður eisini nevnd føraraevnikravið. Reglan er um førara, sum ikki er førur fyri at koyra akfar vegna m.a. sjúku, ovvekur ella undir árini av doyvandi evnum ella líknandi, heruppií heilivági. Tvs. at talan er um koyring, har staðfest er, at førarin ikki hevur verið førur fyri at koyra. Mett verður, at hevur førari verið ávirkaður, samstundis sum hann ikki hevur kunnað koyrt á tryggan hátt, so er hetta álvarsamari enn koyring sambært § 58, stk. 1, har revsingin er sekt, og er talan um herðandi umstøður, sum nevnt í § 58, stk. 2, nr. 2. Sambært galdandi lóg (§ 58, stk. 4) er revsingin sekt, ella um umstøðurnar eru herðandi hefti ella fongsul í upp til 1 ár. Sambært tí, sum nú verður skotið upp, verður revsingin herd, so hon kann verða hefti ella fongsul í upp til 1 ár og 6 mánaðir.

**Til § 58, stk. 2, nr. 3:**
Henda regla svarar til galdandi reglu í § 58, stk. 2, nr. 2, tó soleiðis, at eisini her verður brot á § 15, stk. 1 og 2, síðustillað við rúsdrekkakoyring. Skotið verður sostatt upp, at revsingin kann hækka upp til hefti ella fongsul í 1 ár og 6 mánaðir í mun til í dag 1 ár.

**Til § 58, stk. 2, nr. 4:**
Her verður ásett, at er talan um treytaða frádøming av koyrirættinum vegna rúsdrekkakoyring, og nýtt brot verður framt innan 3 ár, so kann revsingin hækka upp til hefti ella fongsul í 1 ár og 6 mánaðir. Eisini her verður rúsevni og sjúka, overving v.m. sbrt. § 15, stk. 1 og 2, javnsett við rúsdrekkakoyring. Her verður tað tíðarskeið ásett, í hvørjum eitt brot hevur endurtøkuvirknað. Í galdandi lóg verður einans sagt, at revsingin kann hækka upp til 1 ár, um førarin áður er dømdur fyri rúsdrekka- ella promillukoyring (§ 58, stk. 1, nr. 1). Tíðarskeiðið verður nú ásett til 3 ár, og er tað samanfallandi við tað tíðarskeið, sum er ásett í § 59 a, stk. 2, nr. 6 , sbr. § 59 c, stk. 1, um frádømingartíðina í sambandi við treytaða frádøming.

**Til § 58, stk. 2, nr. 5:**
Her verður ásett, at rúsdrekkakoyring, sum annars hevur við sær sekt, kann herðast til hefti ella fongsul í 1 ár og 6 mánaðir, um førarin áður hevur fingið koyriforboð fyri rúsdrekkakoyring sambært § 59 h, og innanfyri 3 ár eftir avgerðina koyrir rúsdrekkakoyring. Her verður sostatt endurtøkuvirknaðurin ásettur, til sama áramál, sum koyriforboðið sambært § 59 a, stk. 2, nr. 7, sbr. § 59 h, fevnir um.

**Til § 58, stk. 2, nr. 6:**
Her verður revsingin fyri treytaleysa frádøming vegna rúsdrekkakoyring ella brot á § 15, stk. 1 ella 2, somuleiðis herd úr hefti ella fongsul í 1 ár til hefti ella fongsul 1 ár og 6 mánaðir. Talan er um, at nýggja brotið er framt innan fyri 5 ára tíðarskeiðið, sbr. § 59, stk. 2, nr. 8, sbr. § 59 c, stk. 1, 3. pkt., í hvørjum førarin hevur mist koyrirættindini treytaleyst. Her verður sostatt endurtøkuvirknaðurin ásettur, til sama áramál, sum treytaleysa frádømingin fevnir um.

**Til § 58, stk. 2, nr. 7:**
Ásetingin er nýggj, og fevnir um rúsdrekkakoyring í sambandi við brúksstuldur. Royndir aðrastaðni hava víst, at vandin fyri ferðsluóhappi, heruppií óhappi, ið hevur við sær persónsskaða, er størri, um rúsdrekkakoyring fer fram í bili, sum er fingin við brúksstuldri. Talan eigur tí at vera um herðandi umstøður.

**Til § 58, stk. 2, nr. 8:**
Her verður ásett, at revsingin kann hækka til hefti ella fongsul í 1 ár og 6 mánaðir, um tilburðurin, umframt at vera rúsdrekkakoyring, er fevndur av § 59 a stk. 1, nr. 1, ið er tað førið, har førarin við stórum fyrilitaloysi fyri ferðslutrygdini hevur volt fólki ella luti skaða ella elvt til vanda fyri tí. Henda regla stendur í dag í § 58, stk. 2, nr. 3. Eisini kann revsingin hækka til hefti ella fongsul í 1 ár og 6 mánaðir um tilburðurin, umframt at vera rúsdrekkakoyring, er fevndur av § 59 a, stk. 1, nr. 3, ið er tað førið, har førarin hevur koyrt við ferð, ið fer upp um loyvdu hámarksferðirnar. Eisini kann revsingin hækka til hefti ella fongsul í 1 ár og 6 mánaðir, um tilburðurin, umframt at vera rúsdrekkakoyring, er fevndur av § 59 a, stk. 1, nr. 4, har talan er um tung akfør, tá førarin hevur koyrt við ferð, ið fer upp um loyvdu hámarksferðirnar ella § 59 a, stk. 1, nr. 5, har talan er um tung akfør, tá ásetingarnar um mest loyvdu heildarvekt verða brotnar.

**Til § 58, stk. 3:**
Reglan í § 58, stk. 3, um rúsdrekkakoyring við prutli, er sama regla sum í galdandi § 58, stk. 3, 2. og 3. pkt., tó soleiðis, at nú eitur tað ikki promillukoyring, men rúsdrekkakoyring.
Galdandi § 58, stk. 3, 1. pkt. um, at promillukoyring verður revsað við sekt er strikað, tí nú er promillukoyring fevnd av regluni í § 58, stk. 1 ella 2, um rúsdrekkakoyring.

**Til § 58, stk. 4:**
Tilvísingin til § 15 er strikað, tí § 15, ið nú verður § 15, stk. 2, er flutt at standa í § 58, stk. 1 og stk. 2.

Niðanfyri sæst hvussu ætlanin er, at bøturnar skulu verða fyri brot á § 18, stk. l, § 18 a, stk. 1 og stk. 4:

**Koyring uttan at hava fingið koyrikort ella endurtikið koyrikort**

| | |
|---|---|
| 1. ferð | kr. 5.000 |
| 2. ferð | kr. 6.000 |
| 3. ferð | kr. 7.500 |
| 4. ferð | kr. 10.000 |
| 5. ferð | 7 daga hefti* |

*møguliga treytaður dómur við korum um samfelagstænastu

Bót fyri brot á ferðslulógina § 18, stk. 1, verður ikki lækkað fyri persónar við serliga lágari inntøku.

Fyri ung undir 18 ár, verður skotið upp, at ákærumyndugleikin nýtir hesar revsiásetingar:

| | |
|---|---|
| 1. ferð | kr. 2.500 |
| 2. ferð | kr. 3.000 |
| 3. ferð | kr. 3.500 |
| 4. ferð | kr. 5.000 |
| 5. ferð | frælsisrevsing |

**Til § 58, stk. 5:**
Í sambandi við, at revsingin fyri koyring í frádømingartíðini nú verður herd úr 1 ári til 1 ár og 6 mánaðar hefti ella fongsul, verður mett, at tá talan er um brot, ið verður framt fyrstu ferð, eigur revsingin at vera umskipað, soleiðis at hon verður sekt, sum svarar til eina netto mánaðarløn. Spurningurin um sekt, hefti ella fongsulsrevsing, í sambandi við, at koyrt verður fyrstu ferð í frádømingartíðini, varð viðgjørdur í sambandi við ferðslulógarbroyting (68/2000), men tá var ikki semja um at gera eina umskipan, havandi í huga fyribyrgjandi árinið, ið hefti ella fongsulsrevsing hevur. Í sambandi við, at fongsulsrevsingin nú verður munandi herd, verður mett, at revsing við sekt í fyrstu ferð føri er meira hóskandi, og tá ein netto mánaðarløn er ein munandi sekt, verður ikki mett, at fyribyrgjandi ávirkanin verður veikari. Við hesum verður revsingin sett ájavnt við revsingina fyri rúsdrekkakoyring við einari promillu uppá 0,51-2,00, og er samsvar við revsingina í donsku ferðslulógini fyri koyring í frádømingartíðarskeiðnum (L. 396/1990).

**Yvirlit yvir revsingina fyri koyring í frádømingartíðini**
**(galdandi rættur samanborin við lógaruppskotið)**

Revsingin fyri koyring í frádømingartíðini er hefti í 7 dagar, fyri brot fyrstu ferð. Sambært uppskotinum verður hetta broytt til eina sekt, sum svarar til eina netto mánaðarløn.
Fyri harumframt at fáa samsvar millum revsitiltøkini fyri rúsdrekkakoyring og koyring í frádømingartíðini, verður skotið upp, at revsingin fyri endurtikna koyring í frádømingartíðini, skal samsvara við revsingina fyri rúsdrekkakoyring í endurtøkuførum við eini promillu, sum liggur millum 0,51 – 2,00.

Sambært lógaruppskotinum fer revsingin í førinum aðru ferð at vera hefti í 10 dagar. Hetta fer, viðvíkjandi longdini á revsingini, at vera ein linking í mun til galdandi rætt, har revsingin er hefti í 14 dagar. Skotið verður upp, at revsingin í útgangsstøðinum verður gjørd treytað, við korum um samfelagstænastu og eina ískoytissekt, svarandi til eina netto mánaðarløn, ella treytað við korum um viðgerð fyri rúsdrekkamisnýtslu og eina ískoytissekt, svarandi til eina hálva ella heila netto mánaðarløn.

Í førinum triðju ferð, svarar revsingin til galdandi leiðreglur fyri ásetingina av longdini á frælsisrevsingini, tvs. 20 daga hefti. Tað verður tikið sum givið, at revsingin hækkar við 10 daga hefti ella fongsul fyri hvørt endurtøkuføri.

Á sama hátt sum við rúsdrekkakoyring, verður skotið upp, at tað í útgangsstøðinum ikki skal dømast ein nýggj treytað frádøming við korum um samfelagstænastu ella viðgerð fyri rúsdrekkamisnýtslu, um viðkomandi áður er dømdur fyri koyring í frádømingartíðini, og viðkomandi í tíðarbilinum fyri endurtøkuvirknað, av nýggjum ger seg sekan í koyring í frádømingartíðini. Í førinum triðju ferð koyring í frádømingartíðini, fer meginreglan sostatt at vera, at revsingin verður treytaleyst hefti í 20 dagar. Sambært lógaruppskotinum, eigur tað eftir hetta, bert í heilt serligum førum, at verða givin ein treytaður dómur við korum um samfelagstænastu í førinum triðju ferð.

| **Koyring í frádømingartíðini** | **Revsing – galdandi rættur** | **Revsing – uppskotið** |
|---|---|---|
| 1. ferð | 7 daga hefti | Sekt (1 netto mánaðarløn) |
| 2. ferð | 14 daga hefti | 10 daga treytað hefti við treyt um samfelagstænastu ella rúsdrekkaviðgerð og ískoytissekt |
| 3. ferð | 20 daga hefti | 20 daga treytaleyst hefti |

| | | |
|---|---|---|
| 4. ferð | 30 daga hefti | 30 daga treytaleyst hefti/fongsul |
| 5. ferð | 40 daga hefti | 40 daga treytaleyst hefti/fongsul |
| 6. ferð | 50 daga hefti | 50 daga treytaleyst hefti/fongsul |
| 7. ferð | 60 daga hefti | 60 daga treytaleyst hefti/fongsul |

**Til § 58, stk. 6-8:**
Í § 58, stk. 6-8 eru nýggjar reglur um áseting av sektum og ískoytissektum fyri rúsdrekkakoyring og koyring í frádømingartíðarskeiðinum. Reglurnar eru tær somu, sum vórðu gjørdar í donsku ferðslulógini við L. 363/2005, ið byggir á álit nr. 1448/2004 "om sanktioner for spirituskørsel og kørsel i frakendelsestiden".

**Til § 58, stk. 6:**
Sambært hesum stykki skulu sektir ásettar sambært § 58, stk. 1, (rúsdrekkakoyring við einari alkoholpromillu í blóðinum, sum er millum 0,51 og 2,00 ella einum alkoholinnihaldi í útandingarluftini millum 0,26 og 1,0 mg pr. litur luft), verða ásettar við atliti at inntøkuviðurskiftunum hjá tí dømda, tá gerðin varð framd, og alkoholpromilluni meðan koyrt varð ella aftaná. Væntandi verður sektin ásett sum mánaðarliga nettolønin hjá viðkomandi faldað við støddini á alkoholpromilluni.

**Niðanfyri sæst hvussu støddin á sektini fyri rúsdrekkakoyring verður roknað:**
Støddin á sektini fyri rúsdrekkakoyring í øllum førum er treytað av inntøkuviðurskiftunum hjá viðkomandi, eisini tá talan er um 0,51 til 0,80 promillu, og verður støddin á sektini ásett eftir støddini á alkoholpromilluni, soleiðis, at sektin verður størri, jú størri promillan hevur verið.

Hetta kann verða gjørt við, at sektin framhaldandi verður roknað við støði í mánaðarligu nettolønini, men soleiðis, at hon verður faldað við støddini á alkoholpromilluni. Við hesum verður á ein einfaldan hátt víst á, at rúsdrekkakoyring verður meira vandamikil, jú hægri promillan er.

Sektin kann verða roknað við støði í hesum formli:

<u>Árlig bruttoinntøka x 1.000 kr. x støddina á promilluni</u>
25.000 kr.

Henda útrokning kann ikki nýtast beinleiðis í førum, har nágreiniliga støddin á promilluni er óviss, ella um promillan er ókend (§ 16, stk. 2). Um støddin á promilluni ikki kann ásettast nágreiniliga, men tó innanfyri eitt øki (t.d. millum 1,50 og 2,00), er tað ein fylgja av meginregluni um, at ein og hvør ivi skal koma ákærda til góðar, at tað

er lægsta virðið, sum skal leggjast til grundar fyri útrokningini av sektini. Í førum har promillan er ókend – eisini innan fyri eitt øki (§ 16, stk. 2) – verður skotið upp at sektin verður roknað sum ein mánaðarløn faldað við lægstu promilluni í revsiverda økinum (0,51-).

Gingið verður út frá, at støddin á sektini verður rundað til næsta tal, sum kann býtast við 500.

Uppskotið hevur við sær, at sektin verður ásett til eina nettománaðarløn, tá promillan er 1,00, og helvtina av eini mánaðar nettoløn, tá promillan er 0,51 og 2 ferðir eina netto mánaðarløn, tá promillan er 2,00.

Er árliga bruttoinntøkan 300.000 kr., fer sektin sambært uppskotinum at skula verða rokna soleiðis:

Ein mánaðarlig nettoløn:

300.000 kr./25.000 * 1.000 = 12.000 kr. (1.000 kr. pr. 25.000 kr. árlig bruttoinntøka)

*Promilla* 0,5:12.000 * 0,51 = 6.120 rundað til næsta tal, ið kann býtast við 500 = 6.000 kr. (móti 4.000 kr. sambært galdandi takstum).
*Promilla* 1,50:12.000 * 1,5 = 18.000kr. (móti 12.000 kr. sambært galdandi takstum).
*Promilla* 2,00:12.000 * 2,0 = 24.000kr. (móti 12.000 kr. sambært galdandi takstum).

**Til § 58, stk. 7:**
Í hesum stykki verður skotið upp, at ískoytissektir givnar í sambandi við treytaða frælsisrevsing sambært § 58, stk. 2 (rúsdrekkakoyring við einari alkoholpromillu yvir 2,00, ella 1,0 mg í útandingarluft), og møguligar sektir og ískoytissektir eftir § 58, stk. 5 (koyring í frádømingartíðarskeiðnum) verða ásettar við atliti at inntøkuviðurskiftunum, tá gerðin varð framd. Gingið verður út frá, at sektin samsvarar eini mánaðarligari nettoløn.

**Til § 58, stk. 8:**
Sambært hesum stykki kann verða vikið frá regluni um ásetan av sektum sambært stk. 6 og 7, tá serligar umstøður tala fyri hesum. Ætlanin við hesi reglu er, at geva møguleika fyri at varðveita higartil galdandi siðvenju, sambært hvørjari rætturin í førum, har tað eru heilt serligar linnandi umstøður, ikki nýtur vanligu ásetingarsiðvenjuna, men ásetir eina lægri sekt eftir ætli.

## Yvirlit yvir revsing í málum um rúsdrekkakoyring
## (galdandi rættur samanborin við uppskotið)

Niðanfyri er víst eitt yvirlit yvir revsing fyri rúsdrekkakoyring eftir galdandi rætti, samanborið við lógaruppskotið. Lógaruppskotið ger ásetingina av galdandi revsing fyri rúsdrekkakoyring munandi einfaldari. Samstundis fer uppskotið í allar flestu førum at viðføra eina herðing av revsingini fyri rúsdrekkakoyring í mun til ásetingarstøði eftir galdandi rætti. Í nøkrum førum fer uppskotið tó at kunna føra við sær eina minni linking.

Fyrstu ferð

| Promilla | Revsing eftir galdandi rætti | Revsing eftir hesum uppskotinum |
|---|---|---|
| 0,51 – 0,80 | Sekt (4000 kr.) | Sekt (1 netto mánaðarløn ganga støddina á promilluni) |
| 0,81 – 2,00 | Sekt (1 netto mánaðarløn) | Sekt (1 netto mánaðarløn ganga støddina á promilluni) |
| 2,01 – 2,50 | 14 daga hefti | 20 daga hefti* |
| 2,51 – | 20 daga hefti | 20 daga hefti* |

*Sum útgangsstøði verður tað dømd ein treytað frælsisrevsing við korum um samfelagstænastu eins og ein sekt afturat, svarandi til eina netto mánaðarløn ella ein treytað frælsisrevsing við korum um viðgerð fyri rúsdrekkamisnýtslu, eins og ein sekt afturat, svarandi til eina netto mánaðarløn.

Aðru ferð

| Promilla | Revsing eftir galdandi rætti | Revsing eftir hesum uppskotinum |
|---|---|---|
| 0,51 – 0,80 | Sekt (5.000 kr.) | 10 daga hefti* ** |
| 0,81 – 1,50 | 10 daga hefti** | 10 daga hefti* ** |
| 1,51 – 2,00 | 14 daga hefti** | 10 daga hefti* ** |
| 2,01 – 2,50 | 20 daga hefti** | 30 daga hefti* ** |
| 2,51 – | 30 daga hefti** | 30 daga hefti* ** |

*Samsvarandi lógaruppskotinum fer tað – alt eftir revsingini fyrstu ferð – at verða dømt antin ein treytaleys frælsisrevsing ella treytað frælsisrevsing við korum um samfelagstænastu ella viðgerð fyri rúsdrekkamisnýtslu, eins og eina sekt afturat.
**10 dagar verða lagdir afturat revsingini um rúsdrekkakoyring fer fram í frádømingartíðini.

Triðju ferð

| Promilla | Revsing eftir galdandi rætti | Revsing eftir hesum uppskotinum |
|---|---|---|
| 0,51 – 0,80 | 10 daga hefti | 20 daga hefti* |
| 0,81 – 2,00 | 30 daga hefti ella fongsul | 20 daga hefti* |
| 2,01 – 2,50 | 30 daga hefti ella fongsul | 40 daga hefti ella fongsul* |
| 2,51 – | 40 daga hefti ella fongsul | 40 daga hefti ella fongsul* |

*Revsing fyri møguliga koyring í frádømingartíðini verður løgd afturat.

Fjórðu ferð

| Promilla | Revsing eftir galdandi rætti | Revsing eftir hesum uppskotinum |
|---|---|---|
| 0,51 – 0,80 | 14 daga hefti | 30 daga hefti* |
| 0,81 – 2,00 | Umleið 40 daga hefti ella fongsul | 30 daga hefti* |
| 2,01 – | Umleið 40 daga hefti ella fongsul | 50 daga hefti ella fongsul* |

*Revsing fyri møguliga koyring í frádømingartíðini verður løgd afturat.

Fimtu ferð

| Promilla | Revsing eftir galdandi rætti | Revsing eftir hesum uppskotinum |
|---|---|---|
| 0,51 – 0,80 | Minst 14 daga hefti | 40 daga hefti ella fongsul* |
| 0,81 – 2,00 | Umleið 60 daga hefti ella fongsul | 40 daga hefti ella fongsul* |
| 2,01 – | Umleið 60 daga hefti ella fongsul | 60 daga hefti ella fongsul* |

*Revsing fyri møguliga koyring í frádømingartíðini verður løgd afturat.

Sættu ferð og eftir tað

| Promilla | Revsing eftir galdandi rætti | Revsing eftir hesum uppskotinum |
|---|---|---|
| 0,51 – 0,80 | Minst 14 daga hefti | 50 daga hefti ella fongsul* |
| 0,81 – 2,00 | Umleið 3 mánaðar hefti ella fongsul | 50 daga hefti ella fongsul* |
| 2,01 – | Umleið 3 mánaðar hefti ella fongsul | 70 daga hefti ella fongsul* |

*Revsing fyri møguliga koyring í frádømingartíðini verður løgd afturat.
Í førum aftaná sættu ferð og seinni, verður skotið upp at uppsetta skipanin verður fylgd, skilt á tann hátt, at revsingin í nevndu dømunum (tvs. promilla í millum 0,51 – 2,00 og promilla oman fyri 2,00) verður hækkað við 10 daga hefti ella fongsul í hvørjum endurtøkuføri.

**Til nr. 26 og nr. 33:**
**Til § 58 a, stk. 1, og § 59 a, stk. 4, nr. 1:**
Broyting verður gjørd í § 58 a, stk. 1, har tað í staðin fyri "§ 36, stk. 1-3" skal standa "§ 36, stk. 1-4". Orsøkin er, at eitt nýtt stk. 3 er komið í § 36, har sett verður bann móti at hava ferðafólk í last- ella vørurúmi.

Eisini eru broytingar gjørdar í greinunum um trygdarbelti, trygdarútgerð til børn, um talið á ferðandi og fallhjálmar.
Revsingin sambært § 58 a, stk. 1, er sekt, og fær førarin sambært § 59 a, stk. 4, nr. 1, klipp í koyrikortið.

Sambært § 42, stk. 4, áliggur tað føraranum at ansa eftir, at ferðandi, ið ikki eru fylt 15 ár, nýta trygdarútgerð sambært reglunum um hetta. Brot á hesa skyldu er fevnt av klippikortskipanini. Tað verður mett, at børn undir 15 ár í nógvum førum ikki hava fatan av, hvønn týdning tað hevur at nýta trygdarútgerð, og fyri lítil børn er tað avgerandi, at førarin sær til, at tey eru bundin, tá koyrt verður. Tí verður ásett, at um førari ikki heldur skylduna at ansa eftir, at børn, sum eru undir 135 cm, nýta serstakt tillagaða trygdarútgerð og ikki sær til, at børn ikki verða flutt í bilum, ið ikki hava sitipláss við trygdarútgerð, sum barnið kann nýta, so skal hetta eisini geva klipp í koyrikortið (§ 42 a, stk. 6).

Eisini eigur tað at geva klipp í koyrikortið, um førarin ikki hevur sæð til, at børn undir 15 ár, sita í trygdarbelti, jbr. § 42 b, stk. 4.

Tilvísing til regluna um førarans skyldu í sambandi við fallhjálmar er endurtøka av galdandi reglu, sum hevur staðið í § 42 a, stk. 2, men sum nú er flutt, soleiðis at talan er um § 42 c, stk. 2.

Lógarbroytingarnar fáa virknað fyri øll mál, ið ikki eru endaliga avgjørd, tá lógin kemur í gildi, sbr. § 3, stk. 1, í revsilógini. Tað fylgir av reglunum í revsilógini § 3, stk. 1, at tá reglur um revsing verða herdar, so fær hetta einans ávirkan á viðurskifti, ið eru framd eftir, at lógin er komin í gildi. Mál, ið eru avgjørd í Føroya rætti í 1. rættarstigi, og sum verða viðgjørd í landsrættinum eftir, at lógin er komin í gildi, fara at skula verða avgjørd endaliga eftir teimum nýggju reglunum, ið ikki vóru galdandi, tá málið var dømt í 1. rættarstigi. Revsingin kann tó ikki verða harðari enn sambært áður galdandi reglum, sbr. § 3, stk. 1 í revsilógini. Somuleiðis verður meginreglan í § 3, stk. 1, í revsilógini at nýta í mun til reglurnar um endurtøkuvirknað í sambandi við brot á reglurnar í t.d. § 15, stk. 1 og 2, um brotið er framt innan lógin er komin í gildi. Avgerðin kann tó ikki verða strangari, enn hon hevði verið sambært teimum reglum, ið vóru galdandi, tá brotið varð framt.
Verður førararætturin frádømdur fylgir tað av § 4, stk. 2, í revsilógini, at frádøming av førararætti einans kann fara fram, um hetta eisini var heimilað í tí lóggávu, sum var galdandi, tá gerðin varð framd. Soleiðis kann heldur ikki verða givin ein strangari frátøkurevsing enn hon, ið kundi verða givin sambært teimum reglum, ið vóru galdandi, tá brotið varð framt. Um harðari revsing ella aðrar rættarfylgjur eru heimilaðar í endurtøkuførum, verða avgerðir, ið eru tiknar sambært áður galdandi rætti, tiknar við eftir teirra innihaldi eins og avgerðir eftir teirri lóg, sambært hvørjari tað nú framda brotið verður dømt, sbr. § 5 í revsilógini.

**Til nr. 27:**
**Til § 58 a, stk. 9-13:**
Við tíðini eru flestu prísir hækkaðir, meðan sektirnar hava staðið í stað, og tann fyribyrgjandi ávirkanin av sektum er so at siga burtur. Soleiðis, verður í nógvum førum mett, at "tað kostar onki" at bróta ferðslulógina.

Í ávísan mun verða sektir sambært ferðslulógini lýstar í viðmerkingunum til tær einstøku lógargreinarnar í lógaruppskotum. Umframt hetta er galdandi tann vanliga reglan í § 80 í revsilógini, har tað sæst, at tá revsingin verður ásett, skal fyrilit verða tikið fyri, hvussu álvarsamt brotið er og til upplýsingar um gerningsmannin sum persón, heruppií hansara vanligu persónligu og sosialu viðurskifti, hansara viðurskifti áðrenn og aftaná at brotið var framt, og hvat fekk hann at fremja brotið.

Somuleiðis er galdandi § 51, stk. 3 í revsilógini, har tað sæst, at tá sektir skulu ásetast, skal fyrilit verða tikið fyri teimum í § 80 í revsilógini nevndu umstøðum og serstakliga fyri gjaldsevnum og til tað, sum er vunnið ella spart við brotinum.

Sektirnar kunnu síggjast í yvirlitinum "Bødetakster for Færøernes politikreds", sum fútin hevur gjørt, og byggir hetta á rættarvenju.

Sektirnar liggja í dag frá 150,00 kr. upp til 9.500,00 kr., og eru tað einar 14 sektir, sum liggja frá 150 kr. til 1500 kr.

Sum sagt, skal tað, tá sektir verða ásettar, verða tikið fyrilit fyri gjaldsevnunum hjá gerningsmanninum, og verður hetta sambært galdandi lóg gjørt soleiðis, at t.d. lærlingar, lesandi og arbeiðsleys gjalda hálvt gjald, tó í minsta lagi 250 kr. Um gerningsmaðurin er undir 18 ár skal helvtin av sektini gjaldast, tó í minsta lagi 150 kr.

Í uppskotinum verður skotið upp, at sektirnr viðvíkjandi ferðslulógini verða lagdar saman. Mett verður at fyribyrgjandi ávirkanin verður veikari, t.d. um ein, sum fremur fleiri brot á ferðslulóggávuna skal sleppa bíligari enn ein persónur, ið fær tey ymisku lógarbrotini viðgjørd og dømd hvørt sær.

Eisini verður skotið upp, at sektirnar fyri brot á ferðslulógina eiga at verða lagdar saman við sektum, ið verða givnar fyri brot á aðra lóggávu.
Samsvarandi eigur eisini at verða givin sekt, um fongsulsrevsing verður givin fyri brot á ferðslulóggávuna ella fyri brot á aðra lóggávu, samstundis sum onnur brot verða framd á ferðslulóggávuna. Her hevur rætturin hildið seg aftur við at geva ískoytissektir í slíkum førum, og tí verður skotið upp, at sektin verður løgd afturat.

Ger skipanin, sum skotin er upp, at tað kemur fyri, at sektin verður sera høg, kann rætturin og løgreglan seta sektirnar niður, serstakliga havandi í huga, at inntøkuviðurskiftini hjá gerningsmanninum, gera, at hesin allarhelst ongantíð verður førur fyri at gjalda, eins og tað í ítøkiligum førum kann vera tørvur á at minka eina samanlagda sekt, um samlaða upphæddin í sjálvum sær ikki tykist rímilig.

Broytingarnar, sum eru skotnar upp, eru komnar í gildi í Danmark, við lóg nr. 474 frá 31. mai 2000.

**Til § 58 a, stk. 9**
Her verður skotið upp, at sektir sambært ferðslulóggávuni verða endurskoðaðar. Framyvir skulu sektir sambært ferðslulógini ella reglum givnum sambært ferðslulógini, verða ásettar til eina upphædd, sum kann býtast við 500 kr. Tað merkir, at minsta sektin verður 500 kr.
Hetta hevur við sær, at tað verða nógv færri ymiskar upphæddir enn í dag. Frá at hava 14 ymiskar sektir upp til 1500 kr., verða tað framyvir einans 3, nevniliga 500, 1.000 og 1.500 kr.
Við hesum verða sektir, sum í dag eru undir 500 kr. hækkaðar til 500 kr. Sektir, sum eru yvir 500 kr., fara at verða hækkaðar til 1.000 kr. Tað verður rætturin, ið tekur støðu til, hvussu stórar sektirnar skulu vera, tó soleiðis, at upphæddin skal kunna býtast við 500, og at minsta upphæddin er 500 kr., tó burtursæð frá teimum í stk. 10 nevndu førum.

**Til § 58 a, stk. 10.**
Reglan í stk. 10 hevur við sær, at ávísir persónar kunnu fáa eina lægri sekt, tó ikki minni enn 300 kr.
Higartil hevur tað verið soleiðis, at persónar, sum fíggjarliga hava verið verri fyri enn onnur, vanliga hava fingið hálva sekt, tó í minsta lagi 250 kr. um viðkomandi er yvir 18 ár, og 150 kr. um viðkomandi er undir 18 ár.
Eftir tí sum nú verður skotið upp, verður sektin tó altíð í minsta lagi 300 kr., og merkir hetta sostatt eisini munandi hækking viðvíkjandi teimum, sum eru undir 18 ár.

**Til § 58 a, stk. 11**
Her verður skotið upp, at gjørd verður ein full samanlegging av sektum í málum viðvíkjandi brotum á ferðslulóggávuna. Hetta merkir, at um talan er um fleiri lógarbrot, so verður vanligur sektartakstur roknaður fyri hvørt brot sær, óansæð um brotini verða dømd sum eitt ella fleiri mál. Fulla samanleggingin innan økið hjá ferðslulóggávuni fer eisini at verða galdandi í førum, har eitt ella fleiri brot á ferðslulóggávuna verða dømd saman við brotum á aðrar serlógir ella á revsilógina.

**Til § 58 a, stk. 12**.
Sambært stk. 12, verður skotið upp, at um talan er um brot á ferðslulógina ella aðra lóg, ið gevur frælsisrevsing, samstundis sum framd eru brot á ferðslulógina, sum geva sekt, so skal dømast sekt umframt frælsisrevsing.

Viðmerkjast skal, at tað einans eru sektir innan øki ferðslulógarinnar, ið koma undir meginregluna um fulla samanlegging eftir reglunum í stk. 11 og 12. Reglurnar, ið eru skotnar upp viðvíkja ikki áseting av sektum uttan fyri øki ferðslulógarinnar. Tá fleiri brot verða framd samstundis á aðra lóggávu, ið hava við sær revsing við sekt, fer samlaða sektin fyri hesi brot sostatt at kunna verða ásett óheft av teimum reglum, sum eru skotnar upp, men ein ella fleiri sektir fyri brot á ferðslulóggávuna, sum verða dømd samstundis, fara at kunna verða tiknar við við fullari upphædd, tá sektin verður roknað.

**Til § 58 a, stk. 13**
Tá ein regla um fulla samanlegging ikki fer at tykjast rímilig í øllum førum, verður skotið upp í stk. 13, at vikið kann verða frá reglunum í stk. 11 og 12, tá serligar grundir tala fyri hesum. Hetta kann t.d. vera førið, tá ein samanlegging av vanligu sektunum førir til eina lutfalsliga ov høga samlaða sekt, eisini tá hugt verður at, hvat slag av brotum talan er um. Reglan kann eisini verða nýtt, tá talan er um at døma eina longri frælsisrevsing, og eina lutfalsliga lítla sekt. Dentur verður tó lagdur á, at tað avgjørt er full samanlegging, sum er høvuðsreglan. Er sostatt talan um eina stutta fongsulsrevsing (fyri t.d. rúsdrekkakoyring, herverk ella harðskap) verður gingið út frá, at dømd verður ein ískoytissekt, um brot á ferðslulógina, ið hava við sær eina sekt við einari ávísari støðd, verða dømd samstundis.

**Til nr. 28:**
**Til § 58 g, stk. 1:**
Broytingin er ein fylgja av, at tað, sum áður æt promillukoyring, nú eisini verður kallað rúsdrekkakoyring.

**Til nr. 29:**
**Yvirskriftin yvir § 59:**
Broyting verður gjørd í yvirskriftini, tí promillukoyring nú verður nevnd rúsdrekkakoyring.

**Til nr. 30:**
**Til § 59:**
Av tí at orðið “promillukoyring” við lógaruppskotinum verður strikað, verður neyðugt at áseta hvar markið gongur fyri, nær frádøming av koyrikortinum er treytaleys, og er markið tað sama, sum higartil hevur verið galdandi, nevniliga um alkoholstyrkin í

blóðinum er hægri enn 0,80 promillu, ella alkoholstyrkin í útandingarluftini er hægri enn 0,40 mg pr. litur luft.

**Til nr. 31:**
**Til § 59 a, stk. 1, nr. 2:**
Av tí, at hugtakið ”promillukoyring” nú verður strikað, verður nú sett í lógina, nær rúsdrekkakoyring við einari lágari promillu hevur við sær treytaða frádøming av koyrirættinum.
Frádømingin verður treytað, um førarin hevur eina alkoholstyrki í blóðinum, sum er hægri enn 0,50 promillu, ella samsvarandi eina alkoholstyrki í útandingarluftini, sum er hægri enn 0,25 mg pr. litur luft.

**Til nr. 32:**
**Til § 59 a, stk. 1, nr. 6:**
Her verður skotið upp, at førari, sum hevur brotið regluna í § 15, stk. 1, um nullmark fyri rúsevnum, ella sum hevur framt brot á § 15, stk. 2, tvs. at hann hevur koyrt uttan at vera førur fyri tí, skal missa koyrikortið treytað. Hetta hevur eisini við sær, at slíkt brot kemur undir regluna um koyriforboð í § 59 h, tí í § 59 h verður sagt, at hon fevnir um brot á § 59 a, stk. 1.

**Til nr. 33:**
**Til § 59 a, stk. 2, nr. 5:**
Her verður ásett, at koyrirætturin skal frádømast førara treytaleyst, um hann undir herðandi umstøðum hevur framt brot á § 15, stk. 2.
Í § 15, stk. 2, stendur sonevnda føraraevnikravið. Førari sum koyrir, hóast hann ikki er førur fyri tí, fremur brot á § 15, stk. 2, og kemur slík koyring undir regluna um treytaða frádøming í § 59 a, stk. 1, nr. 6.
Um førarin hevur verið ávirkaður, samstundis sum hann ikki lýkur føraraevnikravið, so er talan um herðandi umstøður sambært § 59 a, stk. 2, nr. 5, ið hevur við sær treytaleysa frádøming av koyrirættinum.

**Til nr. 34:**
**Til § 59 a, stk. 4, nr. 1:**
Víst verður til viðmerkingarnar **Til nr. 26 (Til § 58 a, stk. 1).**

**Til nr. 35:**
**Til § 59 a, stk. 4, nr. 2:**
Galdandi § 59 a, stk. 4, nr. 2, ið viðvíkur tilburðum, ið geva klipp í koyrikortið, sigur ”tá koyrt er framvið reyðum ljóssignali”. Hetta er ein villa, sum kom í tá ferðslulógin varð broytt, sbr. løgtingslóg nr. 48 frá 15. mai 2007. Hetta verður nú verður rættað.

**Til nr. 36:**
**Til § 59 b:**
Eins og sambært galdandi § 59 b, stk. 1, verður treytaleys frádøming gjørd fyri eitt tíðarskeið uppá millum 6 mánaðir og 10 ár. Skotið verður upp, at revsingin fyri koyring við einari promillu sum er 0,81 til 1,20, sum higartil hevur givið treytaleysa frádøming í 1 ár, verður hækkað til treytaleysa frádøming í 1 ½ ár (sí yvirlitið niðanfyri).

Higartil galdandi áseting um frádøming fyri alla tíð, verður sett í eitt nýtt stk. 3, har treytirnar fyri slíkari frádøming eisini verða settar.

Reglan um treytaleysa frádøming fyri rúsdrekkakoyring, sum stendur í 2. pkt. í galdandi lóg, verður sett í stk. 2. Reglan verður herd við tað at talan verður um treytaleysa frádøming í 3 ár, í førinum fyrstu ferð, um promillan er oman fyri 1,20 ella samsvarandi um alkoholstyrkin í útandingarluft er oman fyri 0,6 mg pr. litur luft. Sambært galdandi rætti er treytaleysa frádømingin í dag frá 1 ári til 2 ár og 6 mánaðir.

Tað verður síðustillað við eina promillu í blóðinum omanfyri 1,20 (0,60 mg pr. litur luft í útandingarluft), um førarin hevur framt brot á § 15, stk. 2, (førarevnikravið), og brotið samstundis er fevnt av § 59 a, stk. 2, nr. 5 (nýtt), tvs. at brotið á § 15, stk. 2, er framt undir herðandi umstøðum.
Herðingarnar eru gjørdar í samsvari við tilmælið í Ferðslutrygdarætlanini um nullmark fyri øðrum rúsandi evnum.

Sambært § 59 b, stk. 3, verður framvegis møguligt at frádøma koyrirættindini fyri alla tíð. Tað kunnu verða so álvarsom føri, at tað hevði strítt ímóti vanligu rættarkensluni, um førarættindini ikki vórðu tikin fyri alla tíð. Talan skal tá vera um álvarsom koyrimistøk, og skal koyringin hava elvt til álvarsaman persónsskaða, og skulu vera slíkir upplýsingar um fyrr framd ferðslulógarbrot, at mett verður, at tað er neyðugt við frádøming fyri alla tíð. Tað verður mett, at førarin í hesum sambandi eisini verður revsaður fyri óviljað manndráp ella óviljaðan likamsløst sambært § 241 ella § 249 í revsilógini.

Í § 59 b, sum hon sambært galdandi lóg er orðað, verður lýsingin av tíðarskeiðinum, tá talan er um rúsdrekkakoyring, sum hon stendur í § 16, stk. 1, 1. og 2. pkt., endurtikin. Orðingin av § 59 b, sum hon nú er skotin upp, endurtekur ikki lýsingina av, nær talan er um rúsdrekkakoyring. Mett verður, at ongin orsøk er til tess, tí sum sagt í § 16, stk. 1, 1. og 2. pkt. verður staðfest, nær persónur verður revsaður fyri rúsdrekkakoyring, heruppií um førið er sum nevnt í § 16, stk. 1, 2. pkt. Ætlanin er sostatt ikki at broyta galdandi rætt á nakran hátt.

**Yvirlit yvir frádømingartíðina í málum um rúsdrekkakoyring (galdandi rættur samanborin við uppskotið)**

Frádøming fyrstu ferð

| Promilla | Frádøming eftir galdandi rætti | Frádøming eftir hesum uppskotinum |
|---|---|---|
| 0,51 – 0,80 | Treytað frádøming | Treytað frádøming |
| 0,81 – 1,20 | Treytaleys frádøming í 1 ár | Treytaleys frádøming í 1½ ár |
| 1,21 – 1,50 | Treytaleys frádøming í 1 ár | Treytaleys frádøming í 3 ár |
| 1,51 – 2,00 | Treytaleys frádøming í 2 ár | Treytaleys frádøming í 3 ár |
| 2,01 – | Treytaleys frádøming í 2½ ár | Treytaleys frádøming í 3 ár |

Frádøming aðru ferð

| Promilla | Frádøming eftir galdandi rætti | Frádøming eftir hesum uppskotinum |
|---|---|---|
| 0,51 – 0,80 | Treytaleys frádøming í 3 ár | Treytaleys frádøming í 3 ár |
| 0,81 – 1,20 | Treytaleys frádøming í 5 ár | Treytaleys frádøming í 5 ár |
| 1,21 – 1,50 | Treytaleys frádøming í 5 ár | Treytaleys frádøming í 5 ár |
| 1,51 – | Treytaleys frádøming í 5 ár | Treytaleys frádøming í 5 ár |

Frádøming triðju ferð

| Promilla | Frádøming eftir galdandi rætti | Frádøming eftir hesum uppskotinum |
|---|---|---|
| 0,51 – 0,80 | Treytaleys frádøming í ? ár | Treytaleys frádøming í 5 ár |
| 0,81 – 1,20 | Treytaleys frádøming í 10 ár | Treytaleys frádøming í 10 ár |
| 1,21 – | Treytaleys frádøming í 10 ár | Treytaleys frádøming í 10 ár* |

*Møguleiki er tó fyri frádøming fyri alla tíð, um førarin undir koyring hevur framt eitt ella fleiri álvarssom koyrimistøk, har koyringin hevur ført til álvarsligan skaða á persón, og har tað koma fram slíkir upplýsingar um, at førarin áður hevur framt ferðslulógarbrot, at ein frádøming fyri alla tíð verður mett neyðug fyri rættarkensluna.

Frádøming fjórðu ferð og dømi eftir tað

| Promilla | Frádøming eftir galdandi rætti | Frádøming eftir hesum uppskotinum |
|---|---|---|
| 0,51 – 0,80 | Treytaleys frádøming í ? ár | Treytaleys frádøming í 10 ár |
| 0,81 – | Treytaleys frádøming fyri alla tíð | Treytaleys frádøming í 10 ár* |

*Møguleiki er tó fyri frádøming fyri alla tíð, um førarin undir koyring hevur framt eitt ella fleiri álvarssom koyrimistøk, har koyringin hevur ført til álvarsligan skaða á persón, og har tað koma fram slíkir upplýsingar um, at førarin áður hevur framt ferðslulógarbrot, at ein frádøming fyri alla tíð verður mett neyðug fyri rættarkensluna.

**Til nr. 37:**
**Til § 59 f, stk. 2:**
Í sambandi við, at reglurnar um rúsdrekkakoyring nú verða herdar, verður skotið upp, at reglan í § 59 f, stk. 2, har ásett verður, at rúsdrekkamisnýtarar, kunnu fáa koyrikortið aftur eftir helvtartíð, um teir eru í viðgerð fyri rúsdrekkamisnýtslu, verður strikað. Tað verður ikki mett fremjandi fyri rættarkensluna, at hesin ávísi bólkur av ferðslulógarbrótarum, ið hevur tørv á viðgerð fyri rúsdrekka, í mun til øll onnur sleppur at fáa koyrirættin aftur eftir helvtartíð.
Umsóknir um at endurvinna koyrirættin sbr. § 59f, stk. 2, í galdandi lóg, sum eru Fútanum í hendi, áðrenn henda lóg fær gildi, verða viðgjørdar eftir higartil galdandi reglum.

**Til nr. 38:**
**Til § 59 f stk. 3:**
Broytingin er ein fylgja av, at § 59 f, stk. 2, verður strikað.

**Til nr. 39:**
**Til § 59 h:**
At reglurnar um rúsdrekkakoyring nú verða herdar, sæst eisini aftur í, at um slíkt lógarbrot verður framt innan fyri 3 tey fyrstu árini eftir, at viðkomandi hevur fingið koyrikort, so kemur hetta undir regluna um koyriforboð. Somuleiðis skal viðkomandi hava luttikið í R/F-skeiði, áðrenn hann kann taka koyriroyndina av nýggjum.

Viðmerkjast kann, at nýggja nr. 6, í § 59 a, stk. 1, hevur við sær, at rúsevni og sjúka v.m. eisini kunnu føra til koyriforboð. Tvs. at brot á § 15 kemur undir reglurnar um koyriforboð, tí § 59 h, vísir til § 59 a, stk. 1, har brot á § 15, stk. 1 ella 2, føra til treytaða frádøming av koyrirættinum.

## Til § 2

**Til § 2, stk. 1:**
Lógin kemur í gildi 1. juli 2009.

**Til § 2, stk. 2:**
Sambært § 42 b í uppskotinum verður ikki møguligt at flyta fleiri ferðandi á baksetrinum í einum bili, enn trygdarútgerð er til. Hetta merkir, at ein familja, ið telur foreldur og fýra ella fleiri børn, ikki longur kann nýta ein vanligan persónbil, ið einans hevur trygdarútgerð til 5 fólk. Fyri at geva fólki tíð til at laga seg eftir herdu krøvunum verður skotið upp, at áseta eina langa freist, soleiðis, at tað fram til 1. januar 2012 verður loyvt at hava fleiri persónar á baksetrinum, enn tað eru sitipláss við trygdarbelti, tvs. at sambært regluni kunnu sita eyka ferðandi, sum eru yvir 135 cm, á baksetrinum í bilinum til 1. januar 2012.

Í Tinganesi desember 2008

**Annika Olsen**
**landsstýriskvinna**

**/ Rúni Joensen**

# Kunngerðir í sambandi við ferðslulógarbroytingar desember 2008:

**1.**
**<u>Uppskot til kunngerð í sambandi við broyting § 15, stk. 1, í ferðslulógini:</u>**

Henda kunngerð um flokking av evnum, ið eru vandamikil fyri ferðslutrygdina, er sama kunngerð sum í Danmark eitur "Bekendtgørelse nr. 655 af 19. juni 2007 om klassificering af færdselssikkerhedsfarlige stoffer".
Galdandi kunngerð um dusandi evni er: "Bekendtgørelse nr. 698 af 31. august 1993 om euforiserende stoffer", sum seinast broytt við "bekendtgørelse nr. 368 af 22. mai 2008."

## Uppskot til
## kunngerð um flokking av evnum, ið eru vandamikil fyri ferðslutrygdina

Við heimild í § 15, stk. 1, í ferðslulógini, sbr. løgtingslógarkunngerð nr. 14 frá 2. mars 1988, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, verður ásett:

**§ 1**. Dusandi evni, ið standa á lista A, B, D, og E í skjali til kunngerð um dusandi evni (bekendtgørelse om euforiserende stoffer), verða flokkað sum vandamikil fyri ferðslutrygdina.
*Stk. 2.* Um tey tilskilaðu heitini á teimum listum, sum eru nevndir í stk. 1, kunnu fevna um fleiri stereoisomerar formar av viðkomandi dusandi evni, er hvør einstakur av hesum formum at meta sum fevndur av stk. 1.

**§ 2.** Staðfesting av, um ein blóðroynd hevur í sær eitt dusandi evni, ið verður flokkað sum vandamikið fyri ferðslutrygdina, skal fara fram við máting av, um blóðroyndin hevur í sær tað virkna evnið, sum í skjali 1 verður tilskilað fyri viðkomandi dusandi evni. Ein blóðroynd verður einans mett at hava í sær eitt virki evni, um mátiðúrslitið fer upp um bagatellmarkið, sum í skjali 1 er tilskilað fyri viðkomandi dusandi evni.

**§ 3.** Um ein blóðroynd hevur í sær eina lítla restmongd av einum dusandi evni, sum er flokkað sum vandamikið fyri ferðslutrygdina, men sum ikki er tilskilað í skjali 1, verður blóðroyndin ikki mett at hava í sær viðkomandi dusandi evni.

**§ 4.** Kunngerðin kemur í gildi...

**Skjal 1**

**Virkin evni og bagatellmark fyri ávís evni, ið eru flokkað sum vandamikil fyri ferðslutrygdina**

| Dusandi evni, sbr. Bekendtgørelse om euforiserende stoffer | Virkið evni[1)] | Bagatellmark (mg. pr. kg. blóð) |
|---|---|---|
| **Listi A** | | |
| **Cannabis** | **THC** | **0,001** |
| **Diacetylmorphin (heroin)** | **Morphin** | **0,010** |
| **Lysergid (LSD)** | | **0,0005** |
| **Evnablandingurin opium** | **Morphin** | **0,010** |
| **Plantan Papaver somnifer L.** | **Morphin** | **0,010** |
| | | |
| **Listi B** | | |
| **Amfetamin** | | **0,020** |
| **Cocain** | | **0,020** |
| **Dextromoramid** | | **0,075** |
| **Dextropropoxyphen** | | **0,050** |
| **Fentanyl** | | **0,001** |
| **Hydrocodon** | | **0,010** |
| **Hydromorphon** | | **0,010** |
| **Ketobemidon** | | **0,025** |
| **Kokablað** | **Cocain** | **0,020** |
| **MBDB** | | **0,020** |
| **MDMA** | | **0,020** |
| **Metamfetamin** | | **0,020** |
| **Methadon** | | **0,050** |

| | | |
|---|---|---|
| **Methylphenidat** | | **0,010** |
| **Morphin** | | **0,010** |
| **Opium** | **Morphin** | **0,010** |
| **Oxycodon** | | **0,010** |
| **Oxymorphon** | | **0,010** |
| **Pethidin** | | **0,10** |
| **PMA** | | **0,020** |
| **PMMA** | | **0,020** |
| **Tetrahydrocannabinol (THC)** | | **0,001** |
| | | |
| **Listi D** | | |
| **Buprenorphin** | | **0,0005** |
| **Flunitrazepam** | | **0,005** |
| **Pentazocin** | | **0,010** |
| **Pentobarbital** | | **1,0** |
| | | |
| **Listi E** | | |
| **Alprazolam** | | **0,005** |
| **Amfepramon** | | **0,003** |
| **Barbital** | | **5,0** |
| **Bromazepam** | | **0,050** |
| **Brotizolam** | | **0,002** |
| **Chlordiazepoxid** | | **0,20** |
| **Clobazam** | | **0,10** |

| | | |
|---|---|---|
| **Clonazepam** | | **0,005** |
| **Diazepam** | | **0,100** |
| **Estazolam** | | **0,050** |
| **Lorazepam** | | **0,020** |
| **Lormetazepam** | | **0,005** |
| **Meprobamat** | | **5,0** |
| **Midazolam** | | **0,050** |
| **Nitrazepam** | | **0,020** |
| **Nordazepam** | | **0,100** |
| **Oxazepam** | | **0,100** |
| **Phenobarbital** | | **10** |
| **Phentermin** | | **0,030** |
| **Temazepam** | | **0,020** |
| **Triazolam** | | **0,002** |
| **Zolpidem** | | **0,080** |
| **Zopiclon** | | **0,010** |

[1)] **Fyri dusandi evni, har onki er gjøllari tilskilað í puntinum virkið evni, er tað virkna evnið tað dusandi evnið.**

**2.**
**<u>Uppskot til kunngerð í sambandi við broyting í § 18 c, stk. 3, í ferðslulógini:</u>**

**Uppskot**
**til kunngerð um broyting í kunngerð um koyrikort og koyrifrálæru**

**§ 1**

Í kunngerð nr. 112 frá 29. september 2005 um koyrikort og koyrifrálæru, sum seinast broytt við kunngerð nr. 70 frá 23. juni 2008, verða gjørdar hesar broytingar:

**1)** Aftaná § 32 c verður sett:

*"Skeið í rúsdrekka og ferðslu (R/F-skeið)*

**§ 32 d**. Frálæran í rúsdrekka og ferðslu (R/F-skeiði) verður givin av koyrilærarum, sum Akstovan hevur góðkent til tess.
*Stk. 2.* Frálæran skal verða givin í samsvari við frálæruætlan, sum landsstýrismaðurin góðkennir. Frálæran skal fara fram sambært uppbýtinum í frálæruætlanini.
*Stk. 3.* R/F-skeiðið hevur 4 undirvísingareindir á 2 1/2 tíma spjatt yvir í minsta lagi 4 vikur. Møtiskylda er til allar undirvísingareindirnar. Reglurnar fyri luttøku í skeiðnum síggjast í frálæruætlan fyri skeið í rúsdrekka og ferðslu. Skeiðsluttakari, ið ikki fylgir hesum reglum, kann vísast burtur.
*Stk. 4.* Eftir luttøku í R/F-skeiði fær luttakarin eitt skeiðsprógv.
*Stk. 5.* R/F-skeiðið, ið skal vera endað, áðrenn farið kann vera til eftiransandi koyriroynd, kann í fyrsta lagi byrja tríggjar mánaðir áðrenn, frádømingartíðin er úti. Henda avmarking kann ikki verða nýtt í sambandi við luttøku í R/F-skeiði vegna koyriforboð."

**2)** Í § 67, stk. 1, verða nr. 1 og nr. 2 orðað soleiðis:
"1) Tá persónur er skuldsettur fyri rúsdrekkakoyring við einum alkoholinnihaldi í blóðinum, meðan koyrt verður ella aftaná, sbr. § 16, stk. 1, 1. og 2. pkt. í ferðslulógini, sum er hægri enn 0,8 promillu ella einum alkoholinnihaldi í útandingarluft, meðan koyrt verður ella aftaná, sbr. § 16, stk. 1, 1. og 2. pkt. í ferðslulógini, sum er hægri enn 0,4 mg pr. litur luft.
2) Tá persónur er skuldsettur fyri rúsdrekkakoyring við einum alkoholinnihaldi í blóðinum, meðan koyrt verður ella aftaná, sbr. § 16, stk. 1, 1. og 2. pkt. í ferðslulógini, sum ikki er hægri enn 0,8 promillu ella einum alkoholinnihaldi í útandingarluft, meðan koyrt verður ella aftaná, sbr. § 16, stk. 1, 1. og 2. pkt. í ferðslulógini, sum ikki er hægri enn 0,4 mg pr. litur luft, tá tann skuldsetti áður er skuldsettur ella dømdur fyri rúsdrekkakoyring, heruppií promillukoyring sambært teimum reglum, ið vóru galdandi um hetta áðrenn 1. juli 2009, ella tá skuldsetti áður er dømdur fyri brot á § 15, stk. 1 ella 2."

**3)** Í § 70, stk. 1, verður sum 2. pkt. sett: ”Er koyrirætturin frádømdur treytað vegna rúsdrekkakoyring, skal viðkomandi innan hava luttikið í skeiði í rúsdrekka og ferðslu (R/F-skeiði).”

**4)** Í § 70, stk. 2, verður sum 2. pkt. sett: “Hóast ein koyriroynd er staðin, skal viðkomandi hava luttikið í R/F-skeiði.”

**5)** Í § 70 verður sum stk. 3 sett:
“Stk. 3. Er koyrirætturin frádømdur treytað vegna rúsdrekkakoyring, sbr. § 18 c, stk. 4, 2. pkt. í ferðslulógini, skal umsøkjarin leggja skeiðsprógv við, sum skjalprógv um luttøku í skeiði í rúsdrekka og ferðslu (R/F-skeiði).”

**6)** Aftaná § 70 verður sett:

**“Kapittul 7 a**
*Endurtøka av koyrirætti aftaná koyriforboð*

**§ 70 a.** Umsøkjari, ið hevur fingið koyriforboð sambært § 59 h í ferðslulógini, kann einans fáa koyrirættin aftur, um hann hevur gjøgnumført serliga koyrifrálæru og/ella luttikið í skeiði í rúsdrekka og ferðslu (R/F-skeiði) og hevur staðið eftiransandi koyriroynd, sbr. § 18 d, stk. 1 og 2, í ferðslulógini.
*Stk. 2.* Serliga koyrifrálæran og/ella R/F-skeiðið skal vera endað, áðrenn farið kann vera til eftiransandi koyriroynd.

**§ 70 b**. Umsókn um endurtøku av koyrirættinum aftaná koyriforboð sambært § 59 h í ferðslulógini verður latin Akstovuni.
*Stk. 2.* Er koyriforboð givið vegna rúsdrekkakoyring, heruppií promillukoyring sambært teimum reglum, ið vóru galdandi um hetta áðrenn 1. juli 2009, sbr. § 59 a, stk. 1, nr. 2, skal umsøkjarin leggja skeiðsprógv við, sum skjalprógv um luttøku í skeiði í rúsdrekka og ferðslu (R/F-skeiði).
*Stk. 3.* Við umsóknini skal vera fotomynd, sbr. § 3, stk. 2, nr. 1. Umsøkjarin skal eisini vátta sín samleika, sbr. § 3, stk. 2, nr. 2. Reglurnar í § 3, stk. 3-6, verða nýttar samsvarandi.”

**7)** Í § 71, verður sum nýtt stk. 2 sett:
“*Stk. 2.* Er koyrirætturin frádømdur treytaleyst vegna rúsdrekkakoyring, heruppií promillukoyring sambært teimum reglum, ið vóru galdandi um hetta áðrenn 1. juli 2009, sbr. § 18 c, stk. 3, 2. pkt. í ferðslulógini, skal umsøkjarin leggja skeiðsprógv við, sum skjalprógv um luttøku í skeiði í rúsdrekka og ferðslu (R/F-skeiði).”

Stk. 2 og 3 verða hereftir stk. 3 og 4.

**8)** § 76 verður orðað soleiðis:

**”§ 76.** Hevur koyrirætturin verið frádømdur treytaleyst, skal umsøkjarin standa eina eftiransandi koyriroynd, áðrenn koyrirætturin kann verða endurvunnin, sbr. tó stk. 2 og 3.
*Stk. 2.* Hevur koyrirætturin verið frádømdur treytaleyst innan fyri 3 tey fyrstu árini eftir, at førarin fekk koyrirættin fyrstu ferð, sbr. § 18 d, stk. 3, í ferðslulógini, skal serlig koyrifrálæra vera gjøgnumførd og eftiransandi koyriroynd staðin innan koyrirætturin kann endurvinnast. Serliga koyrifrálæran, sum í fyrsta lagi kann byrja 3 mánaðir áðrenn frádømingartíðin er úti, skal vera endað, áðrenn farið kann vera til eftiransandi koyriroynd.
*Stk. 3.* Hevur koyrirætturin verið frádømdur treytaleyst vegna rúsdrekkakoyring, heruppií promillukoyring sambært teimum reglum, ið vóru galdandi um hetta áðrenn 1. juli 2009, kann koyrirætturin einans endurvinnast, um umsøkjarin hevur luttikið í skeiði í rúsdrekka og ferðslu (R/F-skeiði), sbr. § 32 d, og hevur staðið eftiransandi koyriroynd. R/F-skeiðið skal vera endað, áðrenn farið kann vera til eftiansandi koyriroynd.
*Stk. 4.* Eftiransandi koyriroynd kann verða hildin áðrenn frádømingartíðin er úti. Verkliga royndin kann tó í fyrsta lagi verða hildin ein mánað áðrenn frádømingartíðin er úti.
*Stk. 5.* Hevur viðkomandi í øðrum førum enn nevnt í stk. 3 staðið eina koyriroynd, ið inniheldur ferðsluástøði, eftir brotið, sum førdi til ákæruna, skal eftiransandi koyriroynd ikki verða hildin, um so er, at royndin er staðin í mesta lagi 1 ár áðrenn frádømingartíðin er úti og í mesta lagi 1 ár áðrenn umsókn um endurtøku av koyrirættinum varð latin inn. Hóast koyriroynd er staðin, skal viðkomandi hava luttikið í R/F-skeiði, sbr. stk. 3. Í hesum førum skal luttøka í R/F-skeiði vera endað í seinasta lagi 3 mánaðir aftaná, at avgerðin um eftiransandi koyriroynd var endalig.”

**§ 2**

Gildiskoma....

**Viðmerkingar**:

**Til nr. 1 og nr. 3-8.**
Fyri á sama hátt at gera greitt, at talan er um skeið í rúsdrekka og ferðslu, og at krav verður sett um, at R/F skal vera staðið, áðrenn koyrirætturin kann fáast aftur, aftaná at hesin er mistur vegna rúsdrekkakoyring, verður koyrikortkunngerðin broytt, so hon er er í samsvari við lógina. Eisini eru broytingar gjørdar, tí onki longur eitur promillukoyring.

**Til nr. 2:**
Broyting verður gjørd í § 67 ”um fyribils tøku av koyrikorti”, har uppbýtið higartil hevur verið millum pormillukoyring og rúsdrekkakoyring.
Av tí, at promillumarkið fyri rúsdrekkakoyring verður sett niður, og at alkoholinnihaldið í útandingarluft nú eisini verður nýtt sum prógv, tá talan er um rúsdrekkakoyring, verður hetta sett í kunngerðina.

Somuleiðis verður ásett, at løgreglan kann taka koyrikortið fyribils, ikki einans tá viðkomandi áður er dømdur fyri rúsdrekkakoyring, men eisini tá skuldsetti áður er dømdur fyri brot á § 15, stk. 1, ella 2, í ferðslulógini.

**3.**
**<u>Uppskot til kunngerð í sambandi við broytingina í § 16 a, stk. 1, í ferðslulógini:</u>**

**Uppskot til kunngerð um útandingar-, spýtt- og sveittaroyndir og kanning av eygum sambært ferðslulógini**

Við heimild í § 16 a, stk. 3, í ferðslulógini, sbr. løgtingslógarkunngerð nr. 14 frá 2. mars 1988, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, verður ásett:

**§ 1.** Førarin av akfari ella reiðfólk, skal lata útandingar-, spýtt- ella sveittaroynd ella lata síni eygu kanna, um løgreglan krevur tað.

**§ 2.** Royndin ella kanningin sambært § 1 verður gjørd har ella har nærhendis, sum eftirlitið hjá løgregluni fer fram, ella har sum komið er fram á viðkomandi, sbr. tó § 16 a, stk. 1, 2. pkt. í ferðslulógini.
*Stk. 2.* Um tað er møguligt skal royndin ella kanningin fara fram á ein slíkan hátt, at hann, sum skal lata royndina ella lata síni eygu kanna, ikki vekur ans.

**§ 3.** Løgreglan kann halda viðkomandi aftur í tí tíðarskeiði, sum er neyðugt til tess at gera royndina ella kanningina. Løgreglan kann krevja, at ein roynd ella kanning verður gjørd afturat.

**§ 4**. Kunngerðin kemur í gildi......

**4.**
**<u>Uppskot til kunngerð í sambandi við broyting í § 36, stk. 3 í ferðslulógini:</u>**

**Uppskot**
**til kunngerð um flutning av ferðafólki í last ella vørurúmi á bilum v.m.**

Við heimild í § 36, stk. 3, § 36 a og § 58 a, stk. 5, í ferðslulógini, sbr. løgtingslógarkunngerð nr. 14 frá 2. mars 1988, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, verður ásett:

*Nýtsluøki*

**§ 1.** Kunngerðin verður at nýta á flutning av ferðafólki í lastini á vørubilum, lastbilum ella traktorrøðum.
*Stk. 2.* Loyvi kann einans verða givið, tá koyringin fer fram eftir endaða skúlagongd, ella skrúðgongur í sambandi við stevnur, bygda- ella býarveitslur o. líkn.

**§ 2.** Koyring sambært § 1 kann einans fara fram við loyvi frá løgregluni. Loyvið skal havast við, tá koyrt verður.

*Umsókn um loyvi*

**§ 3**. Umsókn um loyvi til koyring sambært § 1 skal latast løgregluni (***ella fútanum???).***
*Stk. 2.* Loyvi fevnir um eitt ella fleiri akfør.
*Stk. 3.* Loyvi fevnir bert um eina einstaka koyring.

*Treytirnar fyri at geva loyvi*

**§ 4.** Løgreglan kann eftir ítøkiligari meting av ferðsluviðurskiftunum, heruppií fyrilitinum fyri øðrum ferðandi og ferðafólkunum, geva loyvi til koyring sambært § 1.
*Stk. 2.* Løgreglan ásetir hesar treytir fyri einum loyvinum:
1) innan koyring skal akfarið ella akførini vera góðkend av Akstovuni sambært kunngerð um tilgerð og útgerð hjá akførum, ið verða nýtt til flutning av ferðafólki í last ella vørurúmi v.m.
2) tá koyrt verður mugu ikki fleiri ferðafólk verða flutt, enn góðkenning Akstovunar sigur.

*Innihaldið í loyvinum*

**§ 5.** Loyvið skal hava upplýsing um:
1) merki á akfari/akførunum og merki á møguligum viðfestivognum, skrásetingarnummar og skrokknummar,
2) navn og bústað hjá eigara og brúkara,
3) hvat slag av koyring, loyvið fevnir um,
4) treytirnar fyri loyvinum.
*Stk. 2.* Loyvið skal hava átekning frá Akstovuni um, at akfarið ella akførini eru góðkend til ta koyring, sum loyvið fevnir um.

*Afturtøka av loyvi*

**§ 6.** Løgreglan kann taka aftur eitt loyvi, um treytirnar ikki verða hildnar.

*Kæra*

**§ 7**. Avgerðir hjá løgregluni kunnu kærast til ?????

*Revsing*

**§ 8.** Brot á § 2 verður revsað við sekt.
*Stk. 2.* Verða treytir í loyvi sambært hesi kunngerð ikki hildnar, verður hetta somuleiðis revsað við sekt, sbr. § 58 a, stk. 1, nr. 3, í ferðslulógini.

**5.**
**<u>Uppskot til kunngerð í sambandi við broyting í § 36, stk. 3 í ferðslulógini:</u>**

**Uppskot**
**til kunngerð um tilgerð og útgerð hjá akførum, ið verða nýtt til flutning av ferðafólki í last ella vørurúmi v.m.**

Við heimild í § 10, stk. 1, í ferðslulógini, sbr. løgtingslógarkunngerð nr. 14 frá 2. mars 1988, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, verður ásett:

**§ 1.** Vøru- og lastbilar og traktorrøðir, ið verða nýtt til flutning av fólki í samband við endaða skúlagongd, skrúðgongur v.m., skulu innan koyring verða sýnað og góðkend av Akstovuni sambært leiðreglunum í § 2.

*Stk. 2.* Løgreglan gevur loyvi til koyring sambært stk. 1, sbr. kunngerð um flutning av ferðafólki í last ella vørurúmi á bilum v.m.

*Sýn og góðkenning*

**§ 2.** Tey í § 1 nevndu akfør skulu góðkennast sambært hesum leiðreglum:
1) Vøru- og lastbilar og viðfestir vognar á traktori skulu hava síður, ið eru haldgott ásettar, og lastalúkur framman og aftan, sum eru í minsta lagi 120 cm høgar mátað frá botninum á lastini. Vatnrøtt op í síðunum og í lastalúkum mugu ikki vera størri enn 25 cm, og frástøðan millum botnin á lastini og lastalúkurnar og undirkantin á síðunum má ikki fara upp um 5 cm.
2) Lastin á akfarinum skal hava sterk sitipláss til øll ferðafólk. Sitiplássini skulu vera fullgott fest. Hoybyrður ella annað serliga eldført tilfar kann ikki verða nýtt sum sitipláss.
3) Um akfar skal nýtast til flutning av persóni í koyristóli, skal akfarið hava besløg, sum koyristólurin kann verða festur í. Besløgini til koyristól skulu vera fullgott fest í akfarið.
4) Talið á ferðafólki, sum loyvt er at flyta í lastini, verður ásett av Akstovuni og skrivað í loyvið. Tá talið verður ásett, kann verða lagt til grundar, at breiddin á sitiplássi til hvørt ferðafólk eigur at vera í minsta lagi 450 mm. Í hesum máti kann verða íroknað upp til 35 mm frípláss hvørju megin sitiplássið. Eisini verða íroknað møgulig pláss, har koyristólar kunnu verða settir og festir.
5) Til at fara í og úr skal í minsta lagi 1 trygg trappa vera.
6) Lessingarlastalúka kann ikki verða nýtt, tá farast skal úr og í, og skal verða væl tryggjað móti óætlaðari nýtslu. Lessingarlastalúkan kann tó vera nýtt til rørslutarnaðar persónar sambært reglunum í skjali 1.
7) Akfør við vippilast skulu, tá koyrt verður, vera tryggjað móti nýtslu av vippilastini.
8) Tá koyrt verður, skal í minsta lagi ein eldsløkkjari vera við, og skal hann vera settur á hóskandi stað og vera lættur at koma til hjá føraranum. Eldsløkkjarin skal vera góðkendur og merktur sambært danskan standard DS 2120 ella danskan standard DS/EN 3. Eldsløkkjarin skal eisini vera góðkendur og merktur í í minsta lagi flokki

5 A, 34 B, tó í minsta lagi flokk 13 A, 89 B fyri akfør, sum eru tilgjørd til flutning av meira enn 19 persónum. Somuleiðis skal fyrstahjálparkassi vera við.

9) Lastin/kassin á akfarinum skal vera tilgjørdur soleiðis, at ferðafólk sjálvi kunnu fara úr akfarinum í neyðstøðu.

10) Traktorviðfestivognur skal hava í minsta lagi 2 ásir og stýrigreiður.

*Stk. 2.* Tá eitt akfar verður nýtt til koyring í sambandi við endaða skúlagongd ella í sambandi við skrúðgongur v.m., mugu ikki verða gjørdar broytingar í tilgerð ella útgerð í mun til tað, sum er góðkent sambært hesi kunngerð.

*Gildiskoma*

§ 3. Henda kunngerð kemur í gildi.......

**Skjal 1**

**Tá farast skal úr og í akfar, kann lessingarlastalúkan verða nýtt til rørslutarnaðar persónar sambært hesum leiðreglum:**

1. Lessingarlastalúkan skal hava verið til høvuðseftirlit innan fyri teir seinastu 12 mánaðirnar og ikki hava fingið viðmerkingar. Skjalprógv fyri hesum skal vísast fram, tá akfarið verður sýnað.
2. Tá sýnað verður, skal lessingarlastalúkan verða roynd og vera í lagi.
3. Í minsta lagi 1 m frá lessingarlastalúkuni skal vera ein týðilig avmerking á lastini, og eingin kann vera millum avmerkingina og lessingarlastalúkuna, meðan arbeitt verður við henni.
4. Tryggjast skal, at lessingarlastalúkan ikki kann verða nýtt av ferðafólki, sum er í lastini.
5. Lessingarlastalúkan kann einans verða nýtt, tá rørslutarnaður persónur og møguliga ein hjálpari skal í ella úr.
6. Koyristólar skulu vera fullgott festir á lessingarlastalúkuni, tá farið verður í ella úr.
7. Førarin av akfarinum skal vera kunnaður um hesar treytir, ið skulu vera havdar við, tá koyrt verður.

Góðkenning av lessingarlastalúkuni til tey endamál, sum eru nevnd omanfyri, skal vera áteknað á loyvið.

**6.**
**<u>Broyting í kunngerð vegna broyting í § 42 c í ferðslulógini:</u>**

**Uppskot**
**til kunngerð um broyting í kunngerð um súkklu- og fallhjálmar.**

Í kunngerð nr. 99 frá 22. juni 2000 um súkklu- og fallhjálmar verða gjørdar hesar broytingar:

§ 1.

1) Í innganginum verður "§ 42 a, stk. 4" broytt til: "§42 c, stk. 4".

2) Í § 2, stk. 1, verða orðini "§ 42 a, stk. 1-2" broytt til: "§ 42 c, stk. 1-2".

§ 2.

Gildiskoma..

**Viðmerkingar**:
Broytingin er ein fylgja av, at reglurnar um fallhjálmar í ferðslulógini nú standa í § 42 c, í staðin fyri í § 42 a.

**7.**
**<u>Uppskot til kunngerð í sambandi við broyting í § 42, § 42 a, og § 42 b í ferðslulógini:</u>**
(Hetta er tað, sum stendur í Bekendtgørelse nr. 324 af 7. apríl 2006 om brug af sikkerhedsseler m.v. og bekendtgørelse nr. 357 af 19. april 2006 om krav til sikkerhedsudstyr for børn i biler)

**Uppskot**
**til kunngerð um trygdarbelti, trygdarútgerð ætlað børnum v.m.**

Við heimild í § 10, stk. 1, § 36 a, § 42, stk. 3 og 4, § 42 a, stk. 5, § 42 b, stk. 3, og § 58 a, stk. 5, í ferðslulógini, smb. løgtingslógarkunngerð nr. 14 frá 2. mars 1988 um ferðslu, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008 verður ásett:

**Kapittul 1**
***Søla, marknaðarføring og nýtsla av trygdarútgerð ætlað børnum***

**§ 1.** Serlig trygdarútgerð ætlað børnum, smb. § 42 a, stk. 1 í ferðslulógini, kann bert verða seld, marknaðarførd ella nýtt, um hon er góðkend og merkt sambært reglunum í

1) ECE-reglugerð nr. 44.04 um góðkenning av trygdarútgerð til børn ella seinri tillagingum av reglugerðini. Útgerðin er tá merkt við hesum góðkenningarmerki:

E 18 “her skal standa tekning við sirkli uttanum” !!!

ella

2) ECE-reglugerð 77/541/EØF ella seinri tillagingum av reglugerðini. Útgerðin er tá merkt við hesum góðkenningarmerki:

e 18 “her skal standa tekning við fýrakanti uttanum” !!!

(talið aftaná bókstavin “e” tilskilar, í hvørjum landi góðkenningin er útskrivað).

**Kapittul 2**
***Undantøk frá skylduni at nýta trygdarbelti v.m.***

**§ 2.** Skyldan at nýta trygdarbelti, smb. § 42, stk. 1, í ferðslulógini, er ikki galdandi fyri hesi sløg av koyring:
1) Vinnulig koyring í fjølbygdum øki við eini ferð uppá í mesta lagi 30 km/t, tá viðkomandi skal inn og úr bilinum ferð eftir ferð, og strekkið millum steðgirnar í mesta lagi er 500 m.
2) Koyring í fjølbygdum øki í sambandi við útbering av bræva- og pakkaposti, og tøming av postkassum.
3) Koyring í fjølbygdum øki í sambandi við útbering av dagbløðum til haldarar ella av lýsingarbløðum.

4) Løgreglukoyring við serligum atliti at eftiransan, og í sambandi við flutning av handtiknum og øðrum, sum kunnu verða vandamikil undir koyringini.
*Stk. 2.* Skyldan sambært § 42 , stk. 1, í ferðslulógini at nýta trygdarbelti er heldur ikki galdandi fyri ferðafólk, sum verða flutt í býbussum og bussum, ið eru gjørdir soleiðis, at í minsta lagi 20 prosent eru standipláss, og sum verða nýttir til rutukoyring.
*Stk. 3.* Undantøka eftir stk. 1, nr. 1-3, fevnir ikki um koyring til ella frá tí øki, har viðkomandi skal inn og úr bilinum ferð eftir ferð, ella har tøming av postkassum ella útbering fer fram.

**§ 3.** Skyldan at nýta trygdarbelti ella aðra trygdarútgerð er ikki galdandi fyri persónar, sum við læknaváttan eru undantiknir frá skylduni. Váttanin skal havast við, tá koyrt verður, og skal vísast løgregluni, um hetta verður kravt.
*Stk. 2.* Læknaváttanin skal tilskila tíðarskeiðið, ið váttanin hevur gildi, og hava hetta merki:

Tekning.......(hetta er ikki í galdandi kunngerð – tekningin kann síggjast í donsku: Bekendtgørelse nr. 324 frá 7. apríl 2006). !!!

**§ 4.** Læknaváttan verður givin av tí lækna, sum vanliga viðger umsøkjaran, ella av serlækna. Í ivamálum kann málið verða lagt fyri landslæknan.
*Stk. 2.* Leiðreglurnar hjá Heilsustýrinum um undantøku frá skylduni eftir § 3 eru galdandi.
*Stk. 3.* Læknaváttanir, ið eru útskrivaðar í Íslandi, Noreg ella einum limalandi í evropeiska samveldinum, hava somuleiðis gildi her á landi.

## Kapittul 3
*Nýtslan hjá børnum av trygdarbelti v.m.*

**§ 5.** Ásetingin í § 42 a, stk. 1, í ferðslulógini um nýtsluna hjá børnum av serligari trýgdarútgerð, ið er tillagað barninum, er ikki galdandi fyri flutning av børnum í hýruvognum, tá slík trygdarútgerð ikki er tøk, og
1) barnið er undir 3 ár og nýtir eitt setur á einum øðrum setri enn forsetrinum, ella
2) barnið er trý ár ella eldri og situr á einum øðrum setri enn forsetrinum og nýtir trygdarbelti.

**§ 6.** Ásetingin í § 42 a, stk. 1, í ferðslulógini um nýtsluna hjá børnum av serligari trýgdarútgerð, ið er tillagað barninum, er ikki galdandi fyri flutning av børnum trý ár og eldri, í bilum, ið eru gjørdir til flutning av í mesta lagi níggju ferðandi, íroknað førara, ella vørubilum við einari loyvdari heildarvekt, sum ikki er yvir 3.500 kg, tá
1) talan er um hissini flutning á stuttum strekki í einum bili, har serlig trygdarútgerð tillagað barninum ikki er tøk, og barnið situr á einum øðrum setri enn forsetrinum og nýtir trygdarbelti, ella
2) tað ikki er rúm fyri at seta í serliga trygdarútgerð tillagað barninum, tí baksetrið longu hevur serliga trygdarútgerð, sum verður nýtt av tveimum øðrum børnum, og triðja barnið nýtir eitt sæti á einum øðrum setri enn forsetrinum og nýtir trygdarbelti.

**§ 7.** Bilførarin skal ansa eftir, at §§ 5 og 6 verða hildnar.

**§ 8.** Førarin av einum bili, ið er innrættaður til flutning av meira enn níggju ferðandi, førarin íroknaður, sleppur undan skylduni sambært § 42, stk. 4, 1. pkt., og § 42 a, stk. 6, 1. pkt, í ferðslulógini, at ansa eftir, at ferðandi, ið ikki eru fylt 15 ár, nýta trygdarútgerð sambært § 42, stk. 1, og § 42 a, stk. 4, í ferðslulógini, og reglum ásettum við heimild í § 42, stk. 3, og § 42 a, stk. 5, í ferðslulógini.
*Stk. 2.* Førarin av einum bili, ið er innrættaður til flutning av meira enn níggju ferðandi, førarin íroknaður, skal áðrenn koyring byrjar síggja til, at ferðandi undir 15 ár verða kunnað um reglurnar um nýtslu av trygdarútgerð, um har eru setur við trygdarútgerð.
*Stk. 3.* Upplýsingarskyldan sambært stk. 2, kann fara fram á ein ella fleiri av hesum háttum:
1) Kunning frá føraranum.
2) Kunning frá fylgjara ella tí persóni, sum er tilnevndur sum bólkaleiðari.
3) Kunning á sjónvarpsskíggja í bussinum.
4) Við piktogrammum, ið lúka reglurnar í stakfyriskipanum um tilgerð og útgerð hjá akførum.

**Kapittul 4**
*Talið á ferðandi, ið kunnu verða flutt*

**§ 9.** Ásetingin í § 42 b, stk. 1, í ferðslulógini, sambært hvørjum talið á ferðandi á einum sæti í bili ikki kann fara upp um talið á sitiplássum til ferðandi, sum hava trygdarbelti, er ikki galdandi fyri hesi sløg av koyring:
1) Flutning av fólki, sum av læknaligum grundum sleppa undan skylduni at nýta trygdarútgerð, sbr. § 3, stk. 1.
2) Flutning hjá løgreglu ella bjargingartilbúgving, tá flutningur fer fram av einum størri tali av ferðandi, enn tað eru sitipláss við trygdarbelti, og flutningurin er neyðugur vegna rættarverju, varðveitan av lóg og landaskili, venjingarendamálum ella trygdini hjá ferðandi.
3) Flutning av ferðandi í býbussum og bussum, ið eru innrættaðir við í minsta lagi 20 pst. standiplássum og verða nýttir til rutukoyring.

**Kapittul 5**
*Revsing og gildiskoma*

**§ 10.** Brot á § 1, § 3, stk. 1, 2. pkt., § 7 og § 8, stk. 2, sbr. stk. 3, verður revsað við sekt.

**§ 11.** Henda kunngerð kemur í gildi......., og samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 98 frá 22. juni 2000 um trygdarútgerð ætlað børnum og trygdarbelti.
*Stk. 2.* Trygdarútgerð, sum er góðkend sambært higartil galdandi reglum, kann verða nýtt til 1. januar 2012.

**Viðmerkingar**:

Galdandi kunngerð nr. 98 frá 22. juni 2000 um trygdarútgerð ætlað børnum og trygdarbelti verður við hesum tillagað broytingini í ferðslulógini um trygdarbelti, trygdarútgerð til børn og um talið á ferðandi, sum kunnu vera flutt. Eisini verður gjørd ein dagføring av reglunum viðvíkjandi merking av trygdarútgerð til børn í bilum, og við

tilvísingini til seinri tillagingar í § 1, nr. 1 og nr. 2, verður gjørligt altíð av hava krøvini til trygdarútgerðina hjá børnunum dagførd. Ætlanin er, at tað skal kunna síggjast á heimasíðuni hjá Akstovuni hvørji krøv eru galdandi. Tað skal altíð vera tann tryggasta útgerðin, ið verður nýtt til børnini.

Broytingin merkir sostatt, at tað sum nú stendur í "kunngerð nr. 98 frá 22. juni 2000 um trygdarútgerð ætlað børnum og trygdarbelti" verður strikað. T.e.:

"2) Dansk Standard DS 2190. Útgerðin er tá merkt við hesum góðkenningarmerki:

3) reglum hjá svenska Vägverket (fyrr Trafiksäkerhetsverket). Útgerðin er tá merkt við hesum góðkenningarmerki:

ella

4) serligari góðkenning frá Bileftirliti Føroya, og merkt av hesum."

**8.**
**<u>Uppskot til kunngerð í sambandi við broyting í § 43, stk. 4 í ferðslulógini:</u>**

**Uppskot**
**til kunngerð um útgerð hjá motorsúkklukoyrarum**

Við heimild í § 42, stk. 5, í ferðslulógini, sbr. løgtingslógarkunngerð nr. 14 frá 2. mars 1988 um ferðslu, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, verður ásett:

**§ 1**. Ferðandi á motorsúkklu skulu nýta ryggstuðul, ið hevur CE góðkenningarmerki.

**§ 2**. Akstovuni verður heimilað at góðkenna onnur góðkenningarmerki.

**§ 3**. Gildiskoma....

**9.**
**<u>Kunngerð í sambandi við motoramboð:</u>**
(henda broyting hevur ikki samband við nakra broyting í ferðslulógini)

**Uppskot**
**til kunngerð um broyting í kunngerð um skráseting av motorakførum o.ø.**

Í kunngerð nr. 34 frá 14. apríl 1983 um skráseting av motorakførum o.ø., sum seinast broytt við kunngerð nr. 92 frá 5. juni 2003, verður gjørd henda broyting:

**§ 1**

Í § 1, verður sum stk. 2 og stk. 3 sett:
"*Stk. 2.* Motoramboð, ið er gjørt og verður nýtt til flutning av farmi, ið ikki er neyðugur til tess, at motoramboðið skal virka, skal skrásetast og hava nummarspjaldur, áðrenn tað verður tikið í nýtslu á øki, sum ferðslulógin fevnir um. Slíkt mororamboð kann tó uttan skráseting verða nýtt á privatum øki, heruppií privatum veg, ið ikki er at meta sum privatur felagsvegur, og kann eisini í lítlan mun verða nýtt á privatum felagsvegi og almennum vegi, t.d. fara tvørtur um veg.
*Stk. 3.* Ásetingin í stk. 2, 1. pkt er ikki galdandi fyri:
1) Eitt motoramboð, ið er ætlað at vera ført av persóni til gongu.
2) Ein gaffiltrukk. Ein gaffiltrukkur er eitt lastberandi og lastlyftandi akfar, hvørs eginvekt virkar sum mótvekt hjá lastini."

**§ 2**

Gildiskoma....

**Viðmerkingar:**
Tað verður mett óheppið, at hesi motoramboð ikki koma undir treytirnar um skráseting og harvið skulu lúka sýnskrøvini, tí tað kemur fyri, at tey koyra á almennum vegi við tungari last. Ynskiligt er sostatt at fáa skipaði viðurskifti á økinum. Mett verður ikki, at nøkur orsøk er til at krevja, at motoramboð, ið verður ført av persóni til gongu, og gaffiltrukkar koma undir kravið um skráseting.
Í skrásetingarkunngerðini verður longu víst í § 11, stk. 1, í lógini, har landsstýrið fær heimild til at áseta reglur um skrásetingarskyldu fyri motoramboð, so har skal ongin broyting gerast.